Fíggjarmálaráðið

# B Ú S K A P A R F R Á G R E I Ð I N G I

mars 2011

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

# INNIHALDSYVIRLIT

1. Inngangur ... 3
1.1 Fortreytir og krøv til karmin í 2012 og fram til 2015 ... 3
1.2 Høvuðstiltøkini innan játtanarkarmin í 2012 ... 6
2. Búskapargongdin ... 8
2.1 Føroyska konjunkturbarometrið ... 8
2.2 Nýggjasta konjunkturmetingin hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum ... 11
2.3 Støðan í altjóða búskapinum ... 12
2.4 Hóttanir móti búskaparvøkstrinum ... 13
3. Almenni føroyski búskapurin ... 15
3.1 Landskassin ... 15
3.2 Kommunur ... 17
3.3 Grunnar ... 18
3.4 Almenni geirin undir einum ... 20
4. Framskrivingar ... 22
5. Lýsing av tiltøkum ... 23
Rakstrartiltøk ... 23
6. Løgur ... 29
Appendiks: Framskrivingar ... 33
§ 1 Løgtingið ... 33
§ 2 Løgmansfyrisitingin ... 34
§ 3 Fíggjarmál ... 34
§ 5 Fiskivinnumál ... 36
§ 6 Vinnumál ... 36
§ 7 Mentamál ... 38
§ 11 Heilsumál ... 39
§ 12 Almannamál ... 41
§ 15 Innlendismál ... 44
§ 16 Uttanríkismál ... 45
§ 20 Inntøkur ... 45

# 1. Inngangur

Sambært § 8, stk. 2 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan skal ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran, leggjast við uppskotinum til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar. Uppskotið til løgtingssamtykt skal leggjast fram fyri 1. apríl.

Henda skipanin við at læsa fastan játtanarkarmin fyri komandi árið við einari løgtings-samtykt á vári árið fyri, varð fyrstu ferð roynd í fjør.

## 1.1 Fortreytir og krøv til karmin í 2012 og fram til 2015

Høvuðsfortreytin fyri samlaða játtanarkarmin í 2012 er, at hallið á fíggjarlógini fyri 2012 ikki skal vera størri enn 450 mió. kr. Henda fortreyt varð longu sett av Løgtinginum fyri einum ári síðan, tá Løgtingið eisini samtykti, at fíggjarlógarhallið skal minkast stigvíst soleiðis, at tað verður heilt burtur í 2015. Endamálið við at fáa hallið burtur er at steðga vøkstrinum í landskassaskuldini[1].

At Løgtingið er samt um, at hallið á fíggjarlógini ikki skal vera størri enn 450 mió. kr. í 2012, merkir, at Landsstýrið skal tillaga inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini til hesa fortreyt.

Tað eru tvær rættiliga ymiskar uppgávur at tillaga útreiðslur á einari síðu og inntøkur á hinari síðuni fyri at røkka ætlaða RLÚ-úrslitinum.

Stórur partur av inntøkusíðuni á fíggjarlógini er skattir og avgjøld, sum verða stýrd av búskaparligu konjunkturgongdini í samfelagnum. Inntøkusíðan er tí fyri stóran part grundað á óvissar metingar um framtíðar búskaparvøksturin. Útreiðslusíðan er í so máta lættari at meta um, tí størsti parturin av útreiðslunum er grundaður á politiskar raðfestingar av tænastum og veitingum, sum almennu Føroyar skulu bjóða.

Tað eru sjálvandi eisini óvissur á útreiðslusíðuni, eins og tað eisini verða framdar raðfestingar og tiltøk á inntøkusíðuni við t.d. reguleringum av skattum og inntøku-grundarlagi, men tað er altíð nógv størri óvissa á inntøkusíðuni. Óvissan á útreiðslusíðuni snýr seg serliga um rentugongdina, oljuprísgongdina og úrslitini av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

[1] Tað er ikki bert í Føroyum, at almenna skuldin er ein trupulleiki. Skjótt vaksandi og stór almenn skuld er nú tann størsta búskaparliga avbjóðingin, sum tey mest framkomnu londini í heiminum hava at dragast við. IMF ávarar um, at stóra almenna skuldin má takast í størsta álvara, annars er vandi fyri einari nýggjari heimsumfatandi fíggjarkreppu.

Við so óvissum fortreytum er tað tí ein stór búskaparpolitisk avbjóðing at stýra eftir einum máli, sum er at fáa landskassahallið burtur í 2015. Tað ber til at gera forsøgnir, sum nøkulunda vísa, hvussu stórur búskaparvøksturin verður í nærmastu framtíð, men eingin er førur fyri at spáa um búskaparvøksturin fleiri ár fram í tíðina. Tí skulu metingarnar av inntøkum landskassans fram til 2015 takast við stórum fyrivarni.

Ein annar trupulleiki er, at tiltøk, sum skulu minka um hallið á fíggjarlógini, virka tálmandi á búskaparvøksturin og tí eisini á inntøkur landskassans. Tiltøk, sum skerja útreiðslur landskassans, ella tiltøk, ið økja skattainntøkurnar, minka eftirspurningin í samfelagsbúskapinum og tí eisini í ein ávísan mun bæði búskaparvøkstur og inntøkur landskassans.

Talva 1.1 vísir eina ætlan, hvussu málið at fáa landskassahallið burtur í 2015 kann røkkast. Stýrt verður eftir RLÚ-úrslitinum. RLÚ-hallið á fíggarlógini fyri 2011 er 546 mió. kr., men skal síðan minkast stigvíst, ár fyri ár, fram til 2015, tá tað skal vera null.

Rakstrarútreiðslurnar eru framskrivaðar við 2011-prísum, men landsstýrið er tó samt um, at verða lønarsáttmálarnir broyttir, verður útreiðslukarmurin broyttur tilsvarandi.

Inntøkurnar eru eisini framskrivaðar við støði í 2011-prísum. Hetta merkir, at hædd er ikki tikin fyri prísvøkstri. Verður útreiðslukarmurin hækkaður vegna sáttmálahækkingar, verður inntøkumetingin hækkað samsvarandi.

Grundarlagið fyri framskrivingini av rakstrarútreiðslunum er, at virksemið verður hildið á júst sama støði sum í dag, tó soleiðis, at hædd er tikin fyri komandi broytingum í t.d. demografisku gongdini innan eldraøkið, dýrkandi heilivági og tali av skúlanæmingum. Eisini er hædd tikin fyri tiltøkum, sum politisk avgerð longu er tikin um at fremja, t.d rakstur av ellis- og røktarheimum í gerð og uppstiging av tyrlutilbúgvingini.

Talvan vísir eisini, at um ongar nýggjar raðfestingar verða gjørdar, økjast rakstrarútreiðslurnar kortini 1,4% í miðal árliga nevnda tíðarskeið.

Landsstýrið hevur ásannað, at fyri at røkka málinum at fáa hallið á fíggjarlógini burtur í 2015, mugu rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa meira enn 1% árliga. Hetta merkir, at neyðugt verður við sparitiltøkum komandi árini, sum víst í talvu 1.1. Skulu nýggjar raðfestingar gerast hesi árini, mugu enn fleiri sparingar gerast.

Grundarlagið fyri inntøkuframskrivingini er mettur búskaparvøkstur. Eisini er tað ein fortreyt fyri framskrivingini, at verandi landsskattastigi verður hildin óbroyttur fram til 2015, og at privata nýtslan fer at hækka nakað komandi árini.

Í sambandi við játtanarkarmin 2011 samtykti Løgtingið eisini, at løgukarmurin skal hækkast munandi, í 2012 upp í 280 mió. kr. Hetta fer at økja um virksemið í byggivinnuni og skapa arbeiðspláss í landinum, eisini tí dentur er lagdur á, at løgukrónurnar mest møguligt skulu brúkast innanlands.

Fortreytirnar fyri rentuframskrivingunum er metta gongdin í vaksandi landskassaskuldini og hækkandi rentustøði. Tað er Landsbanki Føroya, sum metir um gongdina í rentuútreiðslum landskassans.

Ógreinaðu tiltøkini í talvuni eru neyðug tiltøk, á bæði inntøku- og útreiðslusíðuni, fyri at røkka politiskt samtykta málinum fyri RLÚ-úrslitið einstøku árini við verandi fortreytum. At tiltøkini eru ógreinað merkir, at tey enn ikki eru politiskt samtykt.

**Talva 1.1: Høvuðsyvirlit yvir RLÚ-úrslit 2011-2016**

| *Mió. kr.* | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur, §20:** | | | | | | |
| Inntøkur byrjan | 4.257 | 4.257 | 4.513 | 4.583 | 4.649 | 4.716 |
| Framskrivingar | 0 | 230 | 70 | 66 | 67 | 69 |
| Ætlað tiltøk í árinum | 0 | 26 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Inntøkur tilsamans** | **4.257** | **4.513** | **4.583** | **4.649** | **4.716** | **4.785** |
| *Indeks* | *100* | *106* | *108* | *109* | *111* | *112* |
| **Rakstrarútreiðslur, §1-§16:** | | | | | | |
| Útreiðslur byrjan | -4.529 | -4.529 | -4.575 | -4.621 | -4.667 | -4.713 |
| Framskrivingar | 0 | -88 | -87 | -37 | -71 | -51 |
| Ætlað tiltøk í árinum | 0 | 42 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ógreinað tiltøk í árinum | 0 | 0 | 41 | -9 | 24 | 3 |
| **Rastrarútreiðslur tilsamans** | **-4.529** | **-4.575** | **-4.621** | **-4.667** | **-4.713** | **-4.761** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *105* |
| **Løguútreiðslur, §1-§16** | **-235** | **-280** | **-280** | **-280** | **-275** | **-275** |
| *Indeks* | *100* | *119* | *119* | *119* | *117* | *117* |
| **Rentuútreiðslur netto, §20** | **-39** | **-88** | **-119** | **-142** | **-146** | **-143** |
| *Indeks* | *100* | *224* | *304* | *364* | *374* | *367* |
| **Ógreinað tiltøk:** | | | | | | |
| Tiltøk byrjan | 0 | 0 | 0 | 136 | 290 | 418 |
| Tiltøk í árinum | 0 | 0 | 136 | 154 | 129 | -25 |
| **Ógreinað tiltøk tilsamans** | **0** | **0** | **136** | **290** | **418** | **393** |
| **RLÚ-úrslit** | **-546** | **-429** | **-300** | **-150** | **0** | **0** |

## 1.2 Høvuðstiltøkini innan játtanarkarmin í 2012

Høvuðsraðfestingarnar í 2012 fara til barnafamiljurnar, útbúgvingarøkið og tilbúgvingina. Løgurnar til skúla-, almanna- og heilsuverkið verða eisini øktar munandi, samstundis sum peningur er settur av til nýtt havrannsóknarskip. Innan almenna bygnaðin verða rationaliseringar og sparingar framdar við at minka talið av aðalráðum úr nýggju niður í seks, og at javnseta løgtingslimir og landsstýrisfólk við aðrar borgarar, tá ið tað snýr seg um endurgjald fyri ferðaútreiðslur.

Fyri at varðveita ungu familjurnar í Føroyum verður barnafrádrátturin øktur, samstundis sum meira verður sett av á útbúgvingarøkinum, bæði til rakstur og løgur.

Í játtanarkørmunum fyri 2012 hevur landsstýrið lagt dent á framhaldandi at tryggja flest møguligum skikkaðum umsøkjarum á miðnámsskúlunum eitt lestrarpláss.

Talið av umsøkjarum til ymsu miðnámsskúlaútbúgvingarnar í ár er eins stórt og í fjør, og liggur um góðar 1.300 umsóknir. Ongantíð hava so nógvir næmingar verið í miðnámsskúlaskipanini, fleiri enn 2.200 á heysti 2011.

Eisini talið av lesandi á maritimu útbúgvingunum komandi skúlaár verður met stórt. Bæði Vinnuháskúlin og Sjómansskúlin í Klaksvík taka inn stórar flokkar á øllum útbúgvingunum.

Játtanin til Fróðskaparsetrið verður hækkað nakað m.a. fyri at skapa rúm fyri fleiri lesandi, og játtanin til lestrarstuðul er framskrivað, so øllum stendur í boði at fáa lestrarstuðul.

Stórur tørvur er at byggja sambýli til fólk við sálarsjúku og menningartarni. Í ár verður farið undir at byggja sambýli til fólk við sálarsjúku, og hildið verður fram í 2012, soleiðis at sambýlið verður klárt at taka í nýtslu í byrjanini av 2013. Somuleiðis verður í ár farið undir fyrireiking at byggja sambýli í Eysturoynni og Norðuroyggjum fyri fólk við menningartarni, og hildið verður fram við byggingini í 2012 og 2013, soleiðis at heimini kunnu lata upp í 2013. Eisini verður í ár farið undir at byggja nýggjan stovn til børn við fjølbreki, og er ætlanin at stovnurin verður klárur at taka í nýtslu miskeiðis í 2013.

Komandi ár verður fult virksemi á Ellis- og røktarheiminum í Vági og á Økisdeplinum í Vági. Í juni 2012 letur Ellis- og røktarheimið í Vestmanna upp, í oktober 2012 letur Ellis- og røktarheimið í Tórshavn upp og í mai 2013 letur Ellis- og røktarheimið í Klaksvík upp.

Tyrlutilbúgvingin verður munandi uppstigað í 2012 samstundis sum tilfeingisgjaldið verður økt.

Longu tá fíggjarlógaruppskotið fyri 2011 varð evnað til, varð lagt upp til at lække talið av aðalráðum úr nýggju niður í seks eftir valið í 2012. Tað hava allir flokkar sagt seg taka undir við, og tí má væntast, at tað verður framt í 2012.

Endamálið við at endurskoða og minka talið av aðalráðum er at fáa meira fyri skattakrónurnar við at samskipa og styrkja fakliga umhvørvið, soleiðis at miðfyrisitingin verður smidligari til frama fyri einum betri tænastustøði. Hetta fer sum frálíður at hava sparingar við sær.

Landsstýrið skjýtur eisini upp at taka av serliga kostnaðarendurgjaldið, sum løgtingslimir og landsstýrisfólk fáa fyri ferðaútreiðslur. Løgtingslimir og landsstýrisfólk verða hereftir javnsett við aðrar borgarar, tá ið tað snýr seg um ferðaendurgjald.

# 2. Búskapargongdin

Hesin parturin snýr seg um nýggjastu konjunkturkanningina hjá Fíggjarmálaráðnum, sum verður samanborin við høvuðsniðurstøðurnar í nýggjastu konjunkturfrágreiðingini hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum. Eisini er ein stutt lýsing av, hvussu støðan í altjóða samfelagnum kann ávirka búskaparútlitini.

## 2.1 Føroyska konjunkturbarometrið

*Framgongd verður í føroyska búskapinum í 2011*

Í januar í ár var aftur ein lítil framgongd í føroyska konjunkturbarometrinum. Samlaða vísitalið fór úr 8 upp í 10 frá juni í fjør til januar í ár. Tað er tilfeingisvinnan og tænastu- og handilsvinnan, sum draga samlaða vísitalið uppeftir, meðan brúkarin og byggivinnan draga niðureftir.

Húsagangirnir hjá Eik og Fiskavirking, verkbannið í fiskiflotanum og vaksandi olju- og matvøruprísir hevur loypt hvøkk á føroyska brúkaran, men hetta hevur ikki nervað tilfeingisvinnuna, sum vigar tyngst í føroyska búskapinum. Tilfeingisvinnan er m.a. ali- og fiskivinnan, sum umboða nógv tann størsta partin av útflutningssíðuni í føroyska búskapinum. Sostatt bendir alt á, at vøksturin í føroyska búskapinum, sum byrjaði í 2010, fer at halda fram í 2011.

Føroyska konjunkturbarometrið er ein hálvárlig spurnarkanning, har føroysk vinna og brúkarar verða spurdir, hvussu tað hevur gingist seinasta árið, og hvussu tey meta, at gongdin fer at hátta seg komandi tíðina. Tað er sjálvandi altíð trupult at gera slíkar metingar, men samanumtikið meta føroyingar, at tað fer at ganga framá í 2011 samanborið við 2010. Búskaparliga var ein lítil framgongd í føroyska búskapinum í 2010 samanborið við 2009, ið var eitt serstakliga vánaligt ár fyri føroyska búskapin.

*Framgongdin hjá tilfeingisvinnunum heldur fram í 2011*

Vísitalið hjá tilfeingisvinnunum fór eitt lítið vet uppeftir í januar í ár samanborið við konjunkturkanningina fyri hálvum ári síðan. Tilfeingisvinnurnar viga tyngst í føroyska konjunkturbarometrinum. Tað er tí eitt rættiliga jaligt tekin fyri føroyska búskapin, at treystið hjá føroysku tilfeingisvinnunum er vorðið alsamt betri síðan 2009, sum var eitt serstakliga vánaligt ár fyri føroyska samfelagsbúskapin sum heild.

Vísitalið hjá føroysku tilfeingisvinnunum var hægst í januar 2007, tá ið tað var 33. Síðan lækkaði vísitalið nógv í tveimum teimum næstu konjunkturkanningunum, sum vórðu gjørdar í juni 2007 og januar 2008. Í hesum báðum kanningunum var vísitalið 17. Hetta var beint áðrenn djúpu kreppuna í fiskivinnuni. Tíðliga í 2008 fekk fiskivinnan stórar trupulleikar við skjótt vaksandi oljuprísum, lágum fiskaprísum og vánaligum fiskiskapi. Tá rapladi vísitalið hjá tilfeingisvinnunum, sum kom heilt niður á – 36 í januar 2009. Í 2010

hækkaði vísitalið aftur. Í juni 2010 var tað komið heilt upp á 18, og í januar í ár var vísitalið hjá føroysku tilfeingisvinnunum 19.

Húsagangirnir hjá Eik og Fiskavirking, sáttmálastríðið í fiskiflotanum og útlitini fyri støðugt vaksandi oljuprísum hava sostatt ikki ávirkað metingarnar hjá tilfeingisvinnunum stórvegis. Hóast hesar neiligu fortreytir, so vænta tilfeingisvinnurnar, at framgongdin í framleiðsluni, sum byrjaði í 2010, fer at halda fram, og at eftirspurningurin, virksemið og inntøkurnar fara at økjast í 2011.

*Tænustuvinnurnar eru bjartskygdar*

Tað hevur gingið spakuliga framá aftur hjá tænastuvinnunum eftir afturgongdina í eftirspurninginum frá 2007 til 2009. Frá januar 2007 til januar 2009 fall vísitalið hjá tænastuvinnunum frá 84 niður á -17, men er nú komið uppaftur á 16, eftir at hava ligið á 4 og 2 í konjunkturkanningunum í 2010. Vísitalið hjá tænastuvinnunum hevur sostatt gjørt eitt rættiligt lop uppeftir í nýggjastu konjunkturkanningini.

Tænastuvinnurnar vænta, at vøksturin í eftirspurninginum fer at halda fram í 2011, og at tað annars fer at ganga framá í tænastuvinnunum, eftir at óvissan um framtíðina hjá Eik varð loyst, tá ið Fíggjarligt Støðufesti seldi føroyska partin av Eik samtakinum til TF-Holding í januar í ár.

*Framgongdin í handilsvinnuni heldur fram*

Umsetningurin hjá føroysku handilsvinnuni minkaði nógv frá 2006 til 2009, men er síðan vaksin aftur, og handilsvinnan væntar, at sølan fer at halda fram við at vaksa í 2011. Vísitalið hjá føroysku handilsvinnuni fór frá 57 í juni 2006 niður á -52 í juni 2009, men er nú komið upp aftur á 23. Tað hevur sostatt gingið framá í handilsvinnuni í 2010 samanborið við 2009, men sølan lá tó langt niðanfyri sølutølini í 2006 og 2007.

*Byggivinnan var allarhelst ov bjartskygd fyri hálvum ári síðan*

Føroyska byggivinnan hevur verið í nøkrum ógvusligum brotasjógvum seinastu árini. Í 2006 og 2007 var ógvusliga stórt virksemi í føroysku byggivinnuni, men eftir heilt stuttari tíð minkaði eftirspurningurin á føroyska byggimarknaðinum burtur í lítið og einki, og í 2009 var lítið virksemið í føroysku byggivinnuni. Miðskeiðis í 2010 vóru ábendingar um ljósari tíðir í føroysku byggivinnuni, men allarhelst hava metingarnar verið ov bjartskygdar á sumri 2010, tí vísitalið hjá byggivinnuni er fallið rættiliga fitt aftur í nýggjastu konjunkturkanningini.

Í januar 2007 var vísitalið hjá byggivinnuni 91, og í januar 2009 var tað fallið heilt niður á -81. Síðan kom tað spakuliga uppaftur. Í juni 2010 var tað -5, men nú er tað fallið niður aftur á -32. Byggivinnan er tí tann vinnugreinin í føroyska konjunkturbarometrinum, sum

hevur havt nógv tey ógvusligastu sveiggini seinastu árini. Byggivinnan hevur næstan rakt bæði loftið og botnin í føroyska konjunkturbarometrinum.

Ein orsøk til mistreystið í byggivinnuni kann vera, at tilsagnir um fígging til nýggjar og størri byggiverkæltanir vórðu tiknar aftur, tá ið Fíggjarligt Støðufesti yvirtók Eik í oktober 2010. Lítli eftirspurningurin eftir lagaligum orkulánum úr Húsalánsgrunninum gevur eisini ábendingar um, at fólk aftra seg og ikki rættiliga eru komin yvir hvøkkin, tá ið Eik samtakið koppaði.

Hetta ávirkar allan tann føroyska byggimarknaðin, sum kann býtast sundur í byggi-fyritøkur, sum fáast við størri byggiverkætlanir og byggimeistarar á sethúsamarknaðinum, ið mest fáast við bústaðabygging og aðrar smærri byggiverkætlanir.

*Eik og Fiskavirking hava loypt hvøkk á vanliga føroyingin*

Tað loypti hvøkk á vanliga føroyingin, tá ið Eik samtakið og Fiskavirking fóru av knóranum í seinnu helvt av 2010. Tað sæst aftur í konjunkturbarometrinum hjá føroysku brúkarunum, sum vóru eitt sindur neiligari í januar í ár samanborið við konjunktur-kanningina í juni 2010. Tað gekk annars rætta vegin við treystinum hjá brúkarunum sam-stundis sum framgongd spakuliga kom í aftur føroyska búskapin. Treystitalið hjá føroysku brúkarunum fór úr -29 í januar 2008 upp í -3 í juni 2010, men er nú fallið aftur niður á -9.

Tað kemur neyvan óvart á nakran, at hendingarnar við Eik, Fiskavirking og arbeiðs-steðgurin í fiskiflotanum hava ávirkað treystið hjá føroysku brúkarunum skeiva vegin. Hendingarnar hava samanumtikið givið vanliga føroyinginum eina neiligari fatan av búskaparligu gongdini. Hetta sást serliga aftur í eftirspurninginum eftir drúgvum nýtsluvørum. Eftirspurningurin eftir bilum minkaði t.d. síðstu mánaðirnar av 2010. Annars var samlaða bilasølan hægri í 2010 enn í 2009.

Konjunkturkanningin gevur ymisk tekin um føroysku brúkararatferðina og privata eftirspurningin í nærmastu framtíð. Føroyski brúkarin hevur verri vónir um sína egnu fíggjarstøðu og um gongdina í føroyska búskapinum sum heild, men brúkarin væntar ikki, at arbeiðsloysið fer at vaksa komandi 12 mánaðirnar. Tað eru heldur færri, sum ætla at brúka pengar til størri keyp og størri ábøtur á húsini, samstundis sum fleiri ætla at keypa bil og nýggj hús komandi árið.

Samanumtikið er tí torført at koma við einari greiðari niðurstøðu um føroysku brúkara-atferðina næstu mánaðirnar. Húsagangirnir hjá Eik og Fiskavirking og arbeiðssteðgurin í fiskiflotanum hava heilt vist havt neiliga ávirkan á brúkarakanningina hesuferð. Tað kann allarhelst taka nakað av tíð, áðrenn fólk hava lagt hesar hendingar aftur um seg og kenna seg tryggari aftur.

## 2.2 Nýggjasta konjunkturmetingin hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum

Búskaparráðið og Landsbankin staðfesta jaligu útlitini í konjunturbarometrinum. Í nýggjastu konjunkturfrágreiðingunum meta Búskaparráðið og Landsbankin, at BTÚ í 2011 og 2012 í miðal kann vaksa 5% um árið í ársins prísum. Vøksturin stavar frá, at útlit eru til frægari fiskiskap eftir botnfiski undir Føroyum næstu árini, umframt at privata nýtslan væntandi fer at vaksa nakað. Eisini verður væntað, at privatar íløgur fara at vaksa. Harafturat kemur eitt íkast til vøksturin í BTÚ frá, at framleiðslan í alivinnuni væntandi veksur nakað næstu árini. Hinvegin fer tað at tálma vøkstrinum, at fíggjarpolitikkurin hjá landi og kommunum væntandi verður táttaður nakað fyri at minka um hall og tað, at peningastovnar mest sannlíkt verða varnir við at vaksa um útlánini.

Búskaparráðið og Landsbankin meta somuleiðis, at arbeiðsloysið lækkar aftur seinni í ár, tá ið fiskavirki, um ikki øll, í búnum eftir Faroe Seafood eru virkin aftur, men eisini tí at útlit eru fyri meira virksemi á fleiri økjum. Sum útlitini eru, verður eisini væntað, at húsarhaldini fara at økja nýtsluna sum partur av inntøkuni nakað í 2011 og 2012 eins og nøkur ár frameftir.

Tað er ikki húsagangurin hjá Eik, men manglandi eftirspurningur eftir fígging til nýtslu og íløgur sum í størstan mun hevur virkað avmarkandi fyri útlánsvirksemið hjá bankunum, hóast varnari útlánspolitikkur helst eisini hevur verið galdandi. Fíggjarstøðan hjá bankunum er framvegis merkt av, at bankarnir øktu lántøkuna nógv á evropeiskum lánsmarknaðum árini 2004-2007, og av at teir hava virkað undir ríkistrygd síðan altjóða fíggjarkreppuna í 2008. Mett verður tó ikki, at viljin ella førleikin til at læna út verður ein álvarslig forðing í 2011 og kanska heldur ikki í 2012

Viðvíkjandi makrelósemjuni verður mett, at nakrir skipabólkar fáa verri veiðirættindi, meðan makrelfiskiskapurin verður í føroyskum sjógvi. Eisini kunnu væntast havna-stongslar fyri landing av makreli í Noregi og ES-londum. Royndirnar frá 2010 vísa tó, at avleiðingarnar av hesum vóru ikki so ógvusligar, tí at alternativir sølumøguleikar finnast.

Samanumtikið samsvarar metingin hjá Búskaparráðnum og Landsbankanum við úrslitini í nýggjastu konjunkturkanningini hjá Fíggjarmálaráðnum, at búskapurin fer at vaksa í 2011 og 2012. Tað, at húsarhaldini verða trygg við at hækka nýtsluna nakað, hevur við sær, at avgjaldsinntøkur hjá landinum kunnu vaksa skjótari enn BTÚ. Konjunkturgongdin fer tí at minka nakað um landskassahallið. Harumframt kann hallið minkast við átøkum uttan at taka burtur allan búskaparvøksturin. Hetta er ynskiligt fyri at almenna skuldin framvegis verður á einum hóskiligum stigi, sum ger, at Føroyar tola sveiggj í búskapinum uttan at missa álit frá egnum borgarum og lánveitarum.

## 2.3 Støðan í altjóða búskapinum

Framgongd hevur nú verið í altjóða búskapinum í eina tíð, men uppreisturin í fleiri londum í miðeystri, jarðskjálvtin í Japan og óvissan um hjálparpakkarnar til tey skuldartungu ES- londini hótta altjóða búskaparvøksturin. Tað er serliga stór óvissa um gongdina í oljuprísinum og altjóða rentuni í nærmastu framtíð.

Breiður uppreisturin seg til Saudia Arabia, sum bæði er tann størsti oljuframleiðarin og hevur tær størstu oljugoymslurnar, so er vandi fyri, at oljuprísurin fer at hækka nógv. Hetta fer at hava við sær, at vøksturin í altjóða búskapinum fer at minka.

Altjóða rentan fylgir vanliga gongdini í búskaparvøkstrinum og inflatiónini. Rentan er tí hækkað, nú gongd er komin í aftur altjóða búskapin, men fer búskaparvøksturin at minka aftur, við vaksandi oljuprísi, so fer altjóða rentan eisini at falla aftur.

Enn er trupult at meta um, hvørjar avleiðingar ógvusligi jarðskjálvtin í Japan fer at hava á gongdina í altjóða búskapinum, men tað er neyvan nakar ivi um, at ógvusliga vanlukkan í Japan fer at ávirka altjóða búskapin. Japan er triðstørsti búskapur í heiminum, og jarðskjálvtin er ógvusligasta vanlukkan, sum hevur rakt landið síðan annan heimsbardaga. Jarðskjálvtin í Japan fer allarhelst at virka tálmandi á altjóða eftirspurningin í nærmastu framtíð, men sum frálíður fara japanarar at byggja landið uppaftur, og tað fer at virka stimbrandi á aljtóða eftirspurningin.

Írland og fleiri lond í Suðurevropa eru illa fyri búskaparliga við stórum almennum halli og stórari almennari skuld. ES hevur framt umfatandi krepputiltøk fyri at hjálpa hesum londum, soleiðis at álitið á evruna ikki minkar ov nógv. Krepputiltøkini hava ikki hjálpt nóg mikið, og ES londini eru enn ikki vorðin samd um, hvussu møgulig onnur krepputiltøk skulu skipast frameftir. Týskland er sterkasti búskapurin í ES, men týskarar hava ikki so stóran áhuga í at brúka nógvar pengar at hjálpa kreppuraktu ES-londunum, um hesi londini ikki sjálvi taka stig til at minka um almenna hallið og almennu skuldina.

Sameingin av Eystur- og Vesturtýsklandi hevur kostað týskarum nógvar pengar. Tað var tí lítil búskaparvøkstur í Týsklandi í nógv ár eftir sameiningina í 1990. Tað er ikki fyrr enn seinastu fáu árini, at gongd er komin í týska búskaparvøksturin. Týskarar hava tí lítlan hug til enn einaferð at brúka búskaparvøksturin til at byggja skuldarbundin lond uppaftur.

Ein onnur orsøk til, at ES londini hava trupult at semjast um nýggjar hjálparpakkar til kreppuraktu ES londini er tann sokallaði *moral hazard*[2] trupulleikin. Um sterku ES-londini

[2] Moral hazard er eitt vælkent búskaprligt hugtak. Moral hazard merkir í stuttum, at tað ber til at tíggja sær ábyrgdarleyst, uttan at tað fær stótvegis avleiðingar.

halda fram við at hjálpa skuldarbundnu ES londunum, er vandi fyri, at skuldarbundnu londini ikki sjálvi fara at taka nøktandi stig til at rætta sín egna búskap uppaftur.

## 2.4 Hóttanir móti búskaparvøkstrinum

Tað er sostatt altíð nøkur viðurskifti, sum hótta búskaparframgongdina. Tey viðurskifti, ið kunna hótta føroyska búskaparframgongdina í nærmastu framtíð eru:

**Vaksandi oljuprísir** tálma búskaparvøksturin. Privati eftirspurningurin av nýtsluvørum minkar, tí fólk skulu fólk skulu brúka ein størri part av lønarkontuni til olju og bensin. Raksturin og úrslitini hjá vinnuni, serliga tí oljutungu vinnuni, versnað. Tað almenna skal eisini brúka ein størri part av skattainntøkunum til vaksandi oljuútreiðslurnar, serstakliga til skipini hjá Strandferðsluni og Fiskiveiðieftirlitinum.

**Vaksandi mat- og rávøruprísir** er ein stórur trupulleiki fyri altjóða búskapin, serliga fyri tey fátøku londini. Eftirspurningurin eftir mat- og rávørum veksur. Londini í Asiu og Latínamerika gerast ríkari og matvanarnir broytast. Hetta økir eftirspurningin eftir matvørum. Samstundis megnar matvøruframleiðslan í øllum heiminum ikki at fylgja fólkavøkstrinum. Útboðið verður tí ov lítið. Støðan verður ikki betri av, at ov lítlar íløgur eru gjørdar í tøkni og framleiðslutól í matvøruídnaðinum seinastu nógvu árini, samstundis sum fleiri náttúruvanlukkur hava rakt heimin. Hetta rakar sjálvandi eisini føroyska búskapin, tí rá- og matvørur verða eisini dýrari at keypa í Føroyum, men hetta eigur eisini at hækka føroyska útflutningsvirðið, tí størsti parturin av føroyska útflutninginum er matvørur og rávørur til fiskaídnaðin.

**Vaksandi renta.** Tað er ógvuliga ivasamt, hvussu gongdin í rentuni verður í nærmastu framtíð. Forsagnirnar um rentugongdina peika allar vegir. Fer búskaparvøksturin at minka, tí oljuprísurin fer upp, so fer rentan neyvan at broytast stórvegis. Hinvegin er rentustøði óvanliga lágt í løtuni, og tí kann rentan næstan bert fara ein veg, og tað er uppeftir. Rentugongdin hevur somu ávirkan á nýtslumøguleikarnar hjá privatu húsarhaldunum og raksturin og úrslitið hjá vinnulívinum, sum gongdin í oljuprísinum.

**Vaksandi inflasjón og minkandi keypiorka.** Vaksandi prísirnir á olju og øðrum rávørum hevur við sær inflasjón, sum merkir, at allir prísir hækka. Føroyingar hava ikki bert føroysku inflasjónina at dragast við, tí føroyingar innflyta næstan allar nýtsluvørur, og tí verður inflasjónin eisini flutt inn úr teimum londum føroyingar keypa frá. Vaksandi inflasjón útholar keypiorkuna, serliga um lønir og skattir verða óbroyttir.

**Minni fíggjarligt rásarúm** hjá familjum, ið hava sett føtur undir egið borð seinastu árini. Nógvar vanligar føroyskar familjur hava bygt og keypt rættiliga dýr hús árini beint undan fíggjarkreppuni. Fíggingartilboðini vóru góð og rentan var lág. Nógv av hesum lánum eru

veitt við tíggju ára avdráttarskáa. Fíggjarliga rásarúmið fer at minka munandi hjá hesum familjum, tá ið tey byrja at rinda avdráttir av húsalánunum.

# 3. Almenni føroyski búskapurin

Niðanfyri verða einstøku partarnir í almenna búskapinum viðgjørdir, og til síðst verður tikið samanum almenna geiran undir einum. Í hesum parti verður sum tað almenna roknað við landskassanum, kommununum og sosialu kassunum ALS og AMEG. Ymiskt annað alment virksemi, ið ikki hevur lógarheimilað krav um inngjald, herundir partafeløg, ymsir grunnar o.s.fr., verður ikki roknað við her. Av tí, at Vinnusjúkugrunnurin er so lítil, verður hann heldur ikki roknaður við, hóast inngjaldið í grunnin er lógarfest.

## 3.1 Landskassin

Landið hevur verið ein støðugur partur av føroyska búskapinum, í einari tíð, tá flestu aðrir partar av búskapinum hava havt stór sveiggj. Stóra avbjóðingin hjá landinum er samstundis at fremja tiltøk fyri at fáa stóra almenna hallið burtur.

Løgtingið mælti í fjør Landstýrinum til at halda seg til eina fimm ára ætlan, soleiðis at hallið verður minkað við 150 mió. kr. um árið og verður heilt burtur í 2015. Stóra avbjóðingin hjá Landsstýrinum er so at fremja hesa ætlan við tiltøkum, sum koma at nerva borgaran minst møguligt.

Tá hugsað verður um støddina á hallinum, er talan tí sjálvandi um eina søguliga stóra avbjóðing fyri politisku skipanina. Um løgtingið tekur undir við hesum uppskotinum til játtanarkarmar, kann staðfestast, at samgongan hevur megnað at koma frá einum fíggjarlógarhalli á 778 mió. kr. í 2010 til undir 450 mió. kr. í fíggjarlógini 2012. Nógv tung tøk eru sostatt tikin, men komandi árini eru eisini sera týdningarmikil í tilgongdini at koma vælferðarsamfelagnum undan skuldarvandanum. Talva 3.1 vísir heildargongdina fyri landskassan árini 2007-2011:

**Talva 3.1: Býti av útreiðslum og inntøkur fyri landskassan 2007-2011**

| *mió. kr.* | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rakstrarútreiðslur | 3.079 | 3.330 | 3.342 | 3.431 | 3.414 |
| 2 Rakstrarinntøkur | -677 | -675 | -666 | -693 | -679 |
| 3 Løguútreiðslur | 288 | 228 | 188 | 169 | 236 |
| 4 Løguinntøkur | -18 | -11 | -7 | -4 | -20 |
| 5 Flytingarútreiðslur | 1.629 | 1.836 | 2.011 | 2.042 | 2.022 |
| 6 Skattir og flytingarinntøkur | -4.653 | -4.752 | -4.535 | -4.589 | -4.881 |
| 7 Flytingar millum alm. myndugl. | 242 | 243 | 212 | 236 | 239 |
| 8 Fíggjarpostar | -36 | 130 | 143 | -5 | 215 |
| **Tilsamans (RLÚ-undirskot)** | **-146** | **330** | **688** | **587** | **546** |

*Roknskapir 2007-2009. Fyribilsroknskapur 2010. Fíggjarlóg 2011

Gongdin í úrslitinum er serliga komin av tveimum stórum lopum. Tað eina stavaði frá einum óvanliga stórum vøkstri í rakstrarútreiðslunum frá 2007 til 2008, og

flytingarútreiðslunum frá 2007 til 2009. Hitt stavaði frá einari óvanliga stórari minking í skattainntøkunum frá 2008 til 2009. Tilsamans standa hesar hendingar fyri størsta partinum av orsøkini til at hallið veksur so skjótt hesi árini.

Síðan 2008 hevur vøksturin í rakstrarútreiðslunum hjá landinum verið lítil og størsti parturin av vøkstrinum er farin til lønir. Vøksturin í skattainntøkunum hevur heldur ikki verið serliga stórur hesi árini. Tað kann viðmerkjast, at í 2011 eru 200 mió. kr. í Skattum og flytingarinntøkum vegna niðurkapitalisering av Íleggingargrunninum í sambandi við flogvallarútbygging. Henda upphædd verður mótsvara við 200 mió. kr. til kapitalinnskot til Vága floghavn undir Fíggjarpostum.

Stóri spurningurin, tá tað ræður um, hvussu lætt ella torført tað verður at fáa hallið burtur, er tí, hvussu skjótt og nógv skatta- og avgjaldsinntøkurnar fara at vaksa, t.d. tá fólk verða meira jalig um framtíðina, og tí økja um privatu nýtsluna. Nær hetta fer at henda er sjálvandi torført at spáa um, men stórt landskassahall kann halda fólkið aftur í at seta nýtsluna upp, tí fólk óttast fyri, at landsstýrið kann vera tvungið at fremja sparingar og skattahækkingar seinni fyri at kunna gjalda til lánveitarar. Hesin óttin minkar, so hvørt hallið minkar, og tí kann væntast, at so hvørt sum hallið á fíggjarlógini minkar, fer nýtslukvotan hjá privatu húsarhaldunum at vaksa.

Stóru fíggjarlógarhallini seinastu árini, hava havt við sær, at skuldin hjá landskassanum er nógv vaksin, sí talvu 3.2.

**Talva 3.2: Langfreistað skuld, stuttfreistað skuld og gjaldføri 2006-2010**

| *mió. kr.* | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|
| Langfreistað skuld | 2.725 | 2.660 | 2.619 | 3.208 | 4.288 |
| Stuttfreistað skuld | 592 | 719 | 971 | 695 | 752 |
| **Bruttoskuld** | **3.317** | **3.379** | **3.590** | **3.903** | **5.040** |
| Tøkur peningur | 1.485 | 2.765 | 2508 | 2.037 | 2.510 |
| **Nettoskuld** | **1.832** | **614** | **1.082** | **1.866** | **2.530** |

*Roknskapir 2006-2009. Fyribilsroknskapur 2010. Viðmerkjast kann, at broytingarnar í talvuni svara ikki til RLÚ-úrslit (t.e. hall landskassans), tí at hugt verður í talvuni bara eftir Standardkontum 04, 07 og 08.

Nettoskuldin lækkaði munandi í 2007 í sambandi við søluna av partabrøvum í BankNordik, men síðan er skuldin vaksin, og er við ársenda 2010 komin upp á 2.530 mió. kr. Við fíggjarlógarhallinum í 2011 á 545 mió. kr. kemur skuldin tí uppum 3 mia. kr. Skuldin nærkast tí 75 % av inntøkum landskassans í 2011 frá skatti, avgjøldum og ríkisveiting. Viðmerkjast skal tó, at av langfreistaðu skuldini eru 500 mió. kr. skuld til danska statin, sum fellur burtur í 2018, um olja í rakstrarverdum nøgdum ikki verður funnin í føroysku undirgrundini.

## 3.2 Kommunur

Føroysku kommunurnar høvdu sera stóran virksemisvøkstur frá 2006 til 2008, og høvdu samsvarandi vaksandi hall hesi árini. Í 2009, 2010 og 2011 hava kommunurnar spent seg fyri at koma í javnvág millum útreiðslur og inntøkur. Hetta er gjørt við at lækka útreiðslurnar og at hækka inntøkurnar (ofta við at hækka kommunuskattin). Fleiri av kommununum hava sjálvar tikið stigini til at koma í javnvág, men í nøkrum førum er hetta gjørt í serligum avtalum við Fíggjarmálaráðið, har kommunustýri hava bundið seg til at klára ávís avlop og lánsafturgjaldan hvørt ár. At summar kommunur yvirhøvur eru komnar so mikið í skuld, at slíkar avtalur er neyðugar, er sera óheppið og neyvan gagnligt fyri kommunala geiran. Eftirmett verður tí í løtuni, um neyðugt er at stramma fíggjarligu reglurnar fyri kommunurnar, so at sleppast kann undan endurtøkum av gongdini seinastu árini.

Talva 3.3 vísir gongdina í kommunala geiranum seinastu árini.

**Talva 3.3: Býti av útreiðslum og inntøkur fyri kommunurnar 2007-2011**

| *mió. kr.* | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** | **2011** |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstur, netto | 993 | 1.085 | 1.067 | 989 | 1.020 |
| Løgur, netto | 488 | 616 | 381 | 299 | 296 |
| Rentur | 17 | 31 | 45 | 42 | 52 |
| Skattur v.m. | 1.402 | 1.397 | 1.324 | 1.359 | 1.336 |
| **Tilsamans (RLÚ-hall)** | **-96** | **-335** | **-169** | **29** | **-32** |

*Roknskapir 2007-2009. Fyribilsroknskapur 2010. Fíggjarætlanir 2011.

Kommunurnar hava í sera stóran mun virkað konjunkturviðvirkandi. Útreiðslurnar, serliga løgurnar, hava verið sera stórar í uppgangstíðini fram til og við 2008, meðan gongdin í 2009-2011 hevur verið munandi meira avmarkandi. Roknast kann tó við, at kommunurnar undir einum eru komnar í fíggjarliga javnvág í 2010, og kommunurnar tí klára sínar skyldur við verandi inntøkugrundarlagi.

Av tí, at kommunurnar undir einum eru í javnvág, skal ikki roknast við stórvegis minkingum í kommunala virkseminum, men kanska hinvegin kann verða ávíst pláss fyri vøkstri í útreiðslum ella fyri at lækka kommunuskattin. Talva 3.3 gevur eina ábending um, at í javnvág fremja kommunurnar løgur fyri umleið 300 mió. kr. um árið.

Kommunurnar eru sera ymiskt fyri fíggjarliga, og tað tí er ymiskt, hvussu roknast kann við, at tær fara at vera fíggjarliga førar fyri at fremja nýggj tiltøk ella skattalækkingar. Fyri at vísa munin, ber til at bólka kommunurnar í tríggjar skuldarbólkar, sí talvu 3.4.

| Talva 3.4: Skuldarbýti hjá kommununum við ársenda 2009 | | | |
|---|---|---|---|
| *tús. kr.* | **Nettoskuld** | **Íbúgvar** | **Nettoskuld / íbúgva** |
| Tórshavnar kommuna* | -58.801 | 19.619 | 3,0 |
| Kommunur yvir 500 íbúgvar | 625.764 | 26.750 | 23,4 |
| Kommunur undir 500 íbúgvar | -14.848 | 1.504 | -9,9 |
| **Allar kommunur** | **552.115** | **47.873** | **14,0** |

**Íroknað Tórshavnar havn*

Skuldin er savnað hjá miðalstóru kommununum, meðan Tórshavnar kommuna og tær heilt smáu kommunurnar ikki hava skuld av týdningi. Orsøkin til munin millum miðalstóru og heilt smáu kommunurnar kann hugsast at vera, at miðalstóru kommunurnar kappast við miðstaðarøkið um at veita almennar tænastur til borgarar og vinnulív, meðan minstu kommunurnar ikki luttaka í slíkari kapping, og tí ikki átaka sær eins stóra skuld. Undir øllum umstøðum er greitt, at torførast er hjá miðalstóru kommununum at fremja kostnaðarmikil tiltøk, eins og miðalstóru kommunurnar hava flest útreiðslur til rentur og avdráttir.

Samanumtikið kann sigast, at meðan Tórshavnar kommuna og minstu kommunurnar eru uttanfyri stórvegis fíggjarligan vanda í løtuni, so er skuldar- og rentubyrðuvandin serliga at finna hjá miðalstóru kommununum. Fíggjarmálaráðið hevur tí seinastu árini, serliga havt eftirlit við teimum miðalstóru kommununum, og um onki broytir seg, kann hetta væntast at halda fram.

## 3.3 Grunnar

Grunnarnir ALS og AMEG eru teir partarnir av almenna vælferðarundirstøðikervinum, sum eru best fyri fíggjaliga. Eginpeningurin hjá ALS er umleið 600 mió. kr., meðan eginpeningurin hjá AMEG er 855 mió. kr. Hesir grunnar standa tó framman fyri stórum avbjóðingum.

Talið av arbeiðsleysum er munandi vaksið seinastu tvey árini, og fíggjarliga úrslitið hjá ALS er tí versnað samsvarandi. Hetta er tó endamálið við ALS, og arbeiðsloysisskipanin avmarkar stutttíðar sosiala kostnaðin av arbeiðsloysi. ALS virkar tí sum ein frálíkur sjálvvirkandi stabilisator av føroyska samfelagsbúskapinum.

Talva 3.5 vísir gongdina hjá ALS seinastu árini.

**Talva 3.5: Býti av útreiðslum og inntøkur fyri ALS 2006-2010**

| *mió. kr.* | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rakstrarútreiðslur | -11 | -11 | -14 | -15 | |
| 2 Rakstrarinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| 3 Løguútreiðslur | 0 | 0 | -23 | -1 | |
| 4 Løguinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| 5 Flytingarútreiðslur | -87 | -50 | -47 | -157 | |
| 6 Skattir og flytingarinntøkur | 146 | 155 | 117 | 191 | |
| 7 Flytingar millum almennar myndugleikar | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| 8 Fíggjarpostar | 0 | 0 | 0 | 0 | |
| **Tilsamans** | **48** | **94** | **33** | **18** | **-112** |

*Tikið frá ALS-roknskapunum 2006-2009. 2010-tøl eru ikki tøk, tó hevur ALS greitt frá at undirskotið verður um 112 mió. kr. í 2010. ALS-Roknskapurin er í talvuni umgjørdur til RLÚ-roknskap í tann tað er gjørligt fyri at kunna samanbera við onnur tøl i hesum parti. Hetta merkir serliga, at avskrivingar ikki vera framdar, og at løgur tí vera útreiðsluførdar beinanvegin sum tær eru framdar.

ALS hevur havt avlop fram til 2010, tá stóra arbeiðsloysið hevði við sær, at arbeiðsloysisútgjaldið vaks munandi. Við einum eginpeningi á 600 mió. kr. við ársenda 2010, er ALS enn fíggjarliga væl fyri. Skipanin væntast tí at hava eginpening til fleiri ár afturat við verandi arbeiðsloysi. Arbeiðsloysishagtølini fara at minka aftur nú fleiri fiskavirki koma í gongd aftur, men tey verða framvegis størri enn árini frammanundan kreppuna.

Talva 3.6 vísir gongdina hjá AMEG seinastu árini.

**Talva 3.6: Býti av útreiðslum og inntøkur fyri AMEG 2006-2010**

| *mió. kr.* | **2006** | **2007** | **2008** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rakstrarútreiðslur | -2 | -2 | -2 | -3 | -3 |
| 2 Rakstrarinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 3 Løguútreiðslur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 Løguinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 Flytingarútreiðslur | -82 | -126 | -158 | -183 | -200 |
| 6 Skattir og flytingarinntøkur | 151 | 229 | 259 | 305 | 297 |
| 7 Flytingar millum almennar myndugleikar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 8 Fíggjarpostar | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans (RLÚ-hall)** | **67** | **101** | **99** | **119** | **94** |

*Tikið frá AMEG-roknskapunum 2006-2010. 2010-roknskapurin er ikki endaligur. Roknskapurin er umgjørdur til RLÚ-roknskap í tann tað er gjørligt fyri at kunna samanbera við onnur tøl i hesum parti. Hetta merkir serliga, at avskrivingar ikki vera framdar, og at løgur tí vera útreiðsluførdar beinanvegin, sum tær eru framdar.

Meðan ALS hevur sum endamál at avmarka tann sosiala kostnaðin av stutttíðar arbeiðsloysi, so er endamálið við AMEG væl meira langsiktað, nevniliga at tryggja eftirløn til føroyingar nógv ár inn í framtíðina. Grunnurin fer at fáa alsamt størri avbjóðingar av, at talið av eldri fer at vaksa munandi komandi árini, og tað verður tí neyðugt hjá AMEG, framhaldandi at seta av til hesar útreiðslur.

Útgjaldið er vaksið munandi seinastu árini, og er nú um 200 mió. kr. um árið. Samstundis er inngjaldið og rentuinntøkurnar vaksnar til umleið 300 mió. kr. Úrslitið liggur um 100 mió. kr. um árið. Í mun til tær skyldur, sum grunnurin hevur, er ivasamt, um hetta er nøktandi. Orsøkin er, at sambært fólkaframskrivingum, versnar lutfallið millum fólk í arbeiðsførum aldri og pensjonistar.

## 3.4 Almenni geirin undir einum

Úrslitini fyri samlaða almenna búskapin er, at landskassin og ALS geva hall, kommunurnar eru í javnvág og AMEG gevur avlop. Heildargongdin, býtt á geirar og útreiðsluslag, sæst í talvu 3.7.

**Talva 3.7: Býti av útreiðslum og inntøkur á høvuðssløg og geirar í 2010**

| *mió. kr.* | Landið | Kommunur | ALS | AMEG | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rakstrarútreiðslur | -3.431 | -1.213 | -15 | -3 | **-4.662** |
| 2 Rakstrarinntøkur | 693 | 235 | 0 | 0 | **928** |
| 3 Løguútreiðslur | -169 | -269 | -1 | 0 | **-439** |
| 4 Løguinntøkur | 4 | 36 | 0 | 0 | **40** |
| 5 Flytingarútreiðslur | -2.042 | -125 | -157 | -200 | **-2.524** |
| 6 Skattir og flytingarinnt. | 4.589 | 1.415 | 191 | 297 | **6.492** |
| 7 Flytingar millum almennar myndugleikar | -236 | -50 | 0 | 0 | **-286** |
| 8 Fíggjarpostar | 5 | 0 | 0 | 0 | **5** |
| **Tilsamans (RLÚ-úrslit)** | **-587** | **29** | **-112** | **94** | **-576** |

*Grundað á fyribilsroknskapir 2010. Fyri ALS eru ikki fingin útgreinað tøl. Einkulttølini fyri ALS eru tí fyri 2009, meðan úrslitið er meting hjá ALS á 112 mió kr. í undirskoti fyri 2010.

Útreiðslurnar hjá tí almenna fara í høvuðsheitum til rakstur og til flytingarútreiðslur. Inntøkurnar koma frá skatti og flytingarinntøkum. Ítøkiliga eru størstu inntøkurnar ávikavist landsskattur og meirvirðisgjald, kommunuskattur, ALS og AM-gjald.

Samanumtikið verður mett, at hallið er ov stórt til at vera haldført. Tí er neyðugt at fremja tiltøk at fáa hallið niður, serstakliga hjá landskassanum.

Nettoskuldarstøðan hjá ymisku pørtunum sæst í talvu 3.8. Fíggjarstøðupostarnir eru taldir saman.

**Talva 3.8: Býti av ogn og skuld býtt á standardkontur og geirar í 2010**

| *mió. kr.* | Landið | Kommunur | ALS | AMEG | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| 02 Fíggjarligur útbúnaður | 923 | 5 | 521 | 569 | **2.018** |
| 03 Goymslur og áogn | 562 | 285 | 3 | 45 | **895** |
| 04 Tøkur peningur | 2.510 | 207 | 179-112* | 242 | **3.026** |
| **Aktiv í alt** | **3.995** | **497** | **591** | **856** | **5.939** |
| | | | | | |
| 05 Útjavningarkonta | -1.045 | -507 | 688-112* | 855 | **-121** |
| 06 Roknskapartøkniligar kontur | 6 | 0 | 0 | | **6** |
| 07 Langfreistað skuld | 4.288 | 895 | 0 | 0 | **5.183** |
| 08 Stuttfreistað skuld | 746 | 109 | 13 | 1 | **869** |
| **Passiv í alt** | **3.995** | **497** | **591** | **856** | **5.937** |

*Grundað á fyribilsroknskapir 2010. ALS-tølini eru 2009-tøl justeraði fyri einum undirskotið á 112 mió. kr. Standardkonta 01 Immateriellur og materielur útbúnaður er ikki tald við. Hjá landskassanum er kontubólkar 021 og 025 harumframt er ikki talt við.

Meðan land og kommunur hava negativa eginogn (eftir hesum uppgerðarhátti) á tilsamans 1.552 mió. kr. (t.e. 1.045 + 507 mió. kr.), so hava grunnarnir positiva eginogn á 1.431 mió. kr (t.e. 688-122+855 mió. kr.). Eftir hesi uppgerð er eginognin hjá almenna geiranum tilsamans 121 mió. kr. við ársenda 2010. Við væntaðu úrslitunum í 2011 hjá landinum og ALS, kann væntast, at eginognin verður negativ. Her skal tó takast fyrivarni fyri ymsum almennum grunnum, sum ikki eru við í hesi uppgerð.

Hóast landið hevur áleið dupult so stóra skuld sum kommunurnar, so eru kommunurnar munandi verri fyri, tí inntøkugrundarlagið hjá kommununum er nógv verri enn inntøkugrundarlagið hjá landinum. Tá tað harumframt verður tikið við, at kommunala skuldin er savnað hjá miðalstóru kommununum (t.e. kommunur frá 450 til 5.000 íbúgvar), er niðurstøðan, at hesar kommunur avgjørt eru tann parturin av almenna geiranum, sum er ringast fyri.

Í hvønn mun ALS og AMEG eru væl ella minni væl fyri, verður í stóran mun avgjørt av, hvussu framtíðin fer at bjóða seg fyri hesum grunnum. Um arbeiðsloysi fellur hampuliga skjótt, verður ALS óiva væl fyri komandi tíðina, meðan AMEG í stóran mun verður avbjóðað av framtíðar broytingum í fólkatalssamansetingini. Undir øllum umstøðum eru tey fyrstu nógvu árini tó ósannlíkt, at hesir grunnar koma illa fyri til at røkja sínar skyldur.

# 4. Framskrivingar

Talva 4.1 vísir framskrivingar fyri árini 2011-2016. Tølini fyri 2011 eru fíggjarlógartøl, og tølini árini eftir eru fíggjarlógartølini fyri 2011 við teimum framskrivingum, sum vóru kendar síðst í mars 2011.

**Talva 4.1: §1 - §20 framskrivingar tilsamans**

| *Mió. kr.* | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan | 2.840 | 2.918 | 2.999 | 3.011 | 3.052 | 3.068 |
| *Indeks* | *100* | *103* | *106* | *106* | *107* | *108* |
| Lógarbundin játtan | 1.499 | 1.544 | 1.566 | 1.591 | 1.622 | 1.656 |
| *Indeks* | *100* | *103* | *104* | *106* | *108* | *110* |
| Stuðulsjáttan | 190 | 154 | 139 | 139 | 138 | 138 |
| *Indeks* | *100* | *81* | *73* | *73* | *73* | *73* |
| **§§ 1 til 16 tilsamans** | **4.529** | **4.617** | **4.704** | **4.741** | **4.812** | **4.862** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *104* | *105* | *106* | *107* |
| **§ 20 Inntøkur** | **-4.218** | **-4.400** | **-4.438** | **-4.481** | **-4.544** | **-4.616** |
| *Indeks* | *100* | *104* | *105* | *106* | *108* | *109* |

*Viðm.: 2011-tølini eru fíggjarlógartøl, uttan møguligar eykajáttanir.*

Framskrivað er við metingum av ymsu játtanunum á fíggjarlógini. Til dømis er heilivágskostnaður, tal av fólkapensjonistum, fyritíðarpensjonistum, tal av næmingum og lesandi, og tøl samsvarandi hesum sett inn í framskrivingarnar.

Í appendiks síggjast útgreiningar av framskrivingunum býttar eftir grein og høvuðskontu. Eisini eru viðmerkingar til framskrivingarnar.

# 5. Lýsing av tiltøkum

Tiltøkini eru býtt upp í sparitiltøk og raðfestingar, sum landsstýrið ætlar at fremja í 2012. Úrslitið á fíggjarlógini 2012 er sostatt fíggjarlóg 2011 við framskrivingum og tiltøkum. Tiltøkini eru sett saman við tí avmarking, at raksturin skal hægst vaksa 1% um árið, samsvarandi politisku ætlanini.

## Rakstrartiltøk

Talva 5.1. vísir ítøkiligu rakstrartiltøkini samantald. Í 2012 verða framd rakstrartiltøk fyri 42 mió. kr., ið er samansett av 44 mió. kr. í sparitiltøkum og 2 mió. kr. í raðfestingum. Sostatt veksur raksturin, aftaná framskrivignar og tiltøk, 1% árliga.

**Talva 5.1: §1 - §20 tiltøk tilsamans, akkumulerað 2012-2016**

| *Mió. kr.* | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan | -17,9 | -17,9 | -17,9 | -17,9 | -17,9 |
| Lógarb. játtan | -23,0 | -23,0 | -23,0 | -23,0 | -23,0 |
| Stuðulsjáttan | -1,1 | -1,1 | -1,1 | -1,1 | -1,1 |
| **§§ 1 til 16 tilsamans** | **-42,0** | **-42,0** | **-42,0** | **-42,0** | **-42,0** |
| | | | | | |
| **§ 20 inntøkur** | **-26,0** | **0,0** | **0,0** | **0,0** | **0,0** |

**Talva 5.2: Tiltøk 2011-2016**

| *Mió. kr.* | FL2011 | 2012 |
|---|---|---|
| §1 | | |
| Løgtingsarbeiði | 30.137 | -1.300 |
| §2 | | |
| Løgmansskrivstovan | 7.397 | 800 |
| Løgmaður og landsstýrið | 6.778 | -700 |
| §3 | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 87.0000 | -13.000 |
| Ógreinaði sparitiltøk | | -1.000 |
| §5 | | |
| Ógreinaði sparitiltøk | | -1.500 |
| §6 | | |
| Vinnumálaráðið | 10.460 | -300 |

| | | |
|---|---|---|
| Sjóvinnustýrið | 8.450 | -500 |
| Sáttmálaeftirlit | 63 | -63 |
| Harðskapsmál | 0 | 1.200 |
| Umsiting av barsilsskipan | 2.000 | -200 |
| Endurgjald til skipasmíð | 500 | -500 |
| Íverksetarahúsið í Klaksvík | 800 | -200 |
| Ógreinaði sparitiltøk | | -1.237 |
| | | |
| §7 | | |
| Miðnámsútbúgvingar | 184.640 | -3.000 |
| | | |
| §11 | | |
| Heilsutrygd | 8.500 | -1.500 |
| Heilsutrygdarveitingar | 142.296 | -2.000 |
| Kommunulæknaskipanin | 10.513 | -1.500 |
| Sjúkrahúsverkið | 626.542 | -1.000 |
| | | |
| §12 | | |
| Fyritíðarpensjón | 268.049 | -10.000 |
| | | |
| §15 | | |
| Umhvørvisstovan | 18.800 | -1.600 |
| Landsverk | 62.730 | -1.500 |
| Orkumál | 1.400 | -400 |
| | | |
| §16 | | |
| Ógreinaði sparitiltøk | | -1.000 |
| | | |
| §20 | | |
| Vanligur landsskattur | -1.505.000 | 14.000 |
| Tilfeingisskattur | -25.000 | -40.000 |
| | | |
| **Tiltøk tilsamans** | | **-68.000** |

Tiltøkini verða nærri lýst niðanfyri.

**§ 1 Løgtingið**

Skotið verður upp, at kostnaðarendurgjaldið fyri ferðaútreiðslur í løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna (§ 1, stk. 2 og stk.3) verður strikað. Løgtingslimir verða sostatt javnsettir við aðrar borgarar, tá tað kemur til ferðaendurgjald. Árlig sparing: 1,3 mió. kr.

**§ 2 Løgmansfyrisitingin**
Kostnaðarendurgjaldið fyri ferðaútreiðslur ásett í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m. (§ 1 stk. 3-5) verður strikað. Landsstýrisfólk verða sostatt javnsett við aðrar borgarar, tá tað kemur til ferðaendurgjald. Árlig sparing: 700 tús. kr.

Játtanin til rakstur av Løgmansskrivstovuni verður hækkað við 800 tús. kr.

**§ 3 Fíggjarmál**
Í mun til verandi rentustøði verður mett, at útreiðslur landskassans til rentustuðul verða 4 mió. kr. lægri í ár enn í fíggjarlógini fyri 2011, og verður hetta útgangsstøði fyri framskrivingini fyri 2012. Lækkingin í rentustuðulinum á 1 %-stig, sum í løtuni stendur at fara til kommunurnar í 2012, fer til landskassan, og verður kommunanna partur av rentustuðulinum hækkaður við 1 prosentstigi. Býtið í rentustuðulinum fer tí í størri mun at líkjast inntøkuskattabýtinum. Hámarkið fyri rentuútreiðslur, sum fáa rentustuðul, fer úr 150 tús. kr. niður á 120 tús. kr. Árlig sparing: 13 mió. kr.

Raksturin í aðalráðnum og stovnum undir verður lækkaður við 1 mió. kr. árliga.

**§ 5 Fiskivinnumál**
Ymsar stuðulsjáttanir til framleiðsluvinnur lækka við 500 tús. kr. árliga.
Raksturin í aðalráðnum og stovnum undir verður lækkaður við 1 mió. kr. árliga.

**§ 6 Vinnumál**
Spart verður í marknaðarføringini av Føroyum. Árlig sparing: 300 tús. kr.

Endurgjald til skipasmíð verður avtikið. Árlig sparing: 500 tús. kr. Av tí, at endurgjald til skipasmíð verður avtikið, verður sáttmálaeftirlit eisini tikið av. Árlig sparing: 63 tús. kr.

Íverksetarahúsið í Klaksvík fær minni í stuðuli. Árlig sparing: 200 tús. kr.

Játtanin til umsitingina av barsilsskipanini verður lækkað við 200 tús. kr. árliga.

Raksturin í aðalráðnum og stovnum undir verður lækkaður við 1.237 tús. kr.

Avsettar verða 1,2 mió. kr. til átak móti harðskapi í parlagi.

**§ 7 Mentamál**
Á játtanini til miðnámsútbúgvingar verður stuðulin til skúla- og næmingaheim niðurlagaður, undirvísingin av lærlingum og SIT-næmingum í modulum verður samskipað og verða meginreglur ásettar um minstamark fyri valflokkar. Árlig sparing: 3 mió. kr.

**§ 11 Heilsumál**
Umsitingin av Heilsutrygd sparir í gjaldinum til TAKS ísv. umlegging. Árlig sparing 1,5 mió. kr.

Fyri heilsutrygdarveitingar verður hægri egingjald sett á heilivág. Árlig sparing: 2 mió. kr.

Kommunulæknaskipanin verður umløgd, soleiðis at avloysararnir verða skipaðir øðrvísi. Árlig sparing 1,5 mió. kr.

Sjúkrahúsverkið skal fremja sparitiltøk fyri 1 mió. kr.

**§ 12 Almannamál**
Almannaráðið skal finna sparingar á 10 mió. kr. Arbeitt verður við ymiskum tiltøkum. Ein møguleiki til sparing, sum landsstýriskvinnan við Almannamálum arbeiðir við er, at sum liður í bruttofiseringini á almannaøkinum verða fyritíðarpensjónir skattliga umlagdar soleiðis, at hægsta fyritíðarpensjon verður javnsett við eina arbeiðsmannaløn. Verður hetta framt og hægsta fyritíðarpensjónin hjá einum stakum verður javnsett við eina arbeiðsmannaløn, so vil hetta hava eina sparing við sær.

**§ 15 Innlendismál**
Umhvørvisstovan fremur rationaliseringar. Árlig sparing: 1,6 mió. kr.

Landsverk fremur rationaliseringar. Árlig sparing: 1,5 mió. kr.

Stuðul til orkumál verður lækkaður. Árlig sparing: 400 tús. kr.

**§ 16 Uttanríkismál**
Sparingar á játtanini til Uttanrikistænastuna verða framdar við at umraðfesta sendistovuvirksemið landafrøðiliga. Árlig sparing: 1 mió. kr.

**§ 20 Inntøkur**
Landsstýrið hevur sum mál at breiðka inntøkugrundarlagið hjá landinum. Hendan breiðkan av inntøkugrundarlagnum saman við afturhaldi á útreiðslusíðu landskassans kemur í fyrsta umfari at verða nýtt til at fáa landskassahallið burtur. Tá javnvág aftur er á fíggjarlógini kemur inntøkubreiðkanin at verða nýtt til útbygging av vælferðarsamfelagnum og til at lætta um skattatrýstið á vanliga borgaran. Ein liður í at breiðka inntøkugrundarlagið er at tryggja at tað almenna fær sín part av tilfeingisrentuni.

*Inntøkur frá tilfeingisrentu*
Tilfeingisrenta er avkast av náttúruríkidømi. Tilfeingisrentan av fiskatilfeinginum verður til, tí fiskatilfeingið er avmarkað bæði av náttúruviðurskiftum og reguleringum. Tá tosa

verður tilfeingisrentu, verður meint við tann partin av avkastinum, ið er útyvir tað sum er vanligt avkast í vinnum, har ongar avmarkingar eru.

Hvussu stór tilfeingisrentan á fiskatilfeinginum er tey einstøku árini, veldst fyrst og fremst um búskaparligar kojunkturar, lívfrøðilig viðurskifti, veiðutrýst og hvussu væl vinnan bygnaðarliga er skipað.

Stóra avbjóðingin er at tryggja, at tilfeingisrentan ella partar av henni ikki fara fyri skeyti orsakað av órentablum rakstri, ið aftur skyldast ov stórum veiðitrýsti og/ella manglandi búskaparligari tillaging í vinnuni.

Fiskatilfeingið og aliloyvi er ogn Føroya fólks, sum nøkur fá feløg ella persónar hava fingið at gagnnýta, og tí er tað sjálvsagt, at landið fær sín part av einari møguligari tilfeingisrentu. Tað eru ymiskir mátar at gera hetta uppá, sum lýst niðanfyri.

*Almenn uppboðssøla*

Á pappírinum er almenn upboðssøla tað besta amboðið. Ein uppboðssøla vil tillaga vinnuna soleiðis, at samfelagsliga avkastið verður størst møguligt. Ein uppboðssøla vil býta tilfeingisrentuna soleiðis, at tað almenna fær størsta partin, restina fáa tey dugnaligastu vinnulívsfólkini. Tað eru tó stórar avbjóðingar í at seta í verk eina tílíka skipan, tí løgurnar í týðandi pørtum av vinnuni eru sera stórar. Hetta ger seg serliga galdandi fyri alivinnuna, uppisjóvarvinnuna, rækjuvinnuna og Barentshavsflotin.

*Yvirskotsskattur*

Her kunnu hugsast tveir ymiskir hættir. Ein hækking av partafelagsskattinum fyri hesar vinnur, ella ein serskattur á serliga stórar vinningar. Báðir hesir møguleikar verða brúktir í oljuvinnuni.

Serskatturin hevur tann fyrimun, at hann bara skattar sjálva tilfeingisrentuna, men vansin er, at ein tílíkur skattur er trupulari at seta upp og umsita.

Hækkaði partafelagsskatturin hevur tann fyrimun, at hann er lættur at áseta og umsita, men hann rakar eisini tann partin av vinninginum, ið ikki er tilfeingisrenta.

*Avgjald á kilo ella umsetning*

Kilo ella umsetningsavgjald hevur tann fyrimun, at tað er lutfalsliga lætt at umsita, og gjøldini til landskassan sveiggja ikki so nógv frá einum ári til annað.

Gjaldið hevur tann vansa, at vinnan fer at fata gjaldið sum ein eykakostnað líka mikið um tað gongst vinnuni væl ella illa, og gjaldið kann tí koma at skapa gjaldføristrupulleikar

undir lágkonjunkturum. Gjaldið kann eisini í ávísum førum koma at merkja, at fyritøkur, ið annars høvdu klárað seg, noyðast at steingja.

Fyri fíggjaárið 2011 er sum kunnugt ein ávísur tilfeingisrentuskattur settur í verk. Talan er um ein hækkaðan partafelagsskatt uppá 2,5 % á skattskyldugar inntøkur omanfyri eina millión.

Landsstýrið er ikki enn komið til eina endaliga niðurstøðu um, hvussu stóran part av tilfeingisrentuni tað almenna skal taka, og hvussu hetta skal gerast, men tað er mál landsstýrisins at ein nýggj skipan viðvíkjandi fiski- og alivinnuni skal verða klár at seta íverk frá 1. januar 2012. Fyri fíggjarárið 2012 hevur landsstýrið mett inntøkur frá tilfeingisrentu at geva 40 mió. kr.

Henda skipan skal eisini loysa spurningin um, hvat skal henda aftaná 2018, soleiðis at fiskivinnan kann fáa tryggar karmar at virka undir. Hetta verður gjørt í samstarvi við vinnuna.

# 6. Løgur

Í hesi parti eru løgutiltøk landsstýrisins sett upp. Løgur fyri 280 mió. kr. skulu eftir ætlan fremjast í 2012.

Í talvu 6.1 niðanfyri er løguætlan landsstýrisins fyri 2012-2016 at síggja.

**Talva 6.1: Langtíðarløguætlan 2011-2016**

| *Tús. kr.* | **2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §2 | | | | | | |
| Umbygging í Tinganesi | 1.500 | 2.700 | 2.500 | 2.500 | 3.500 | 3.500 |
| **§2 tilsamans** | **1.500** | **2.700** | **2.500** | **2.500** | **3.500** | **3.500** |
| §5 | | | | | | |
| Nýtt havrannsóknarskip | 25.000 | 30.000 | 55.000 | 90.000 | 0 | 0 |
| **§5 tilsamans** | **25.000** | **30.000** | **55.000** | **90.000** | **0** | **0** |
| §6 | | | | | | |
| Granskingarlund | 10.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skúvoyarferja | 0 | 5.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§6 tilsamans** | **10.000** | **5.000** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| §7 | | | | | | |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 5.000 | 6.000 | 6.000 | 5.000 | 0 | 0 |
| Norðurdepilin | 0 | 0 | 0 | 0 | 1.000 | 10.000 |
| Skúladepil við Marknagil | 38.500 | 80.000 | 97.500 | 97.500 | 107.300 | 0 |
| Studentaskúlin í Hoydølum | 3.000 | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 25.000 |
| Tjóðleikhús | 5.000 | 2.000 | 2.000 | 3.000 | 3.000 | 34.000 |
| Tjóðsavn | 0 | 0 | 0 | 0 | 1.300 | 20.000 |
| Hvalastøðin við Áir | 2.500 | 1.000 | 500 | 500 | 500 | 500 |
| Kirkjubømúrurin | 2.000 | 1.000 | 500 | 500 | 0 | 0 |
| Kringvarpshúsið | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ítróttarhøll í Sandoynni | 10.000 | 11.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **§7 tilsamans** | **66.000** | **103.000** | **106.500** | **106.500** | **113.100** | **89.500** |
| §11 | | | | | | |
| Apoteksverkið | 4.800 | 5.200 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Medicoteknisk tól | 11.000 | 7.200 | 8.000 | 9.100 | 12.000 | 11.000 |
| Landssjúkrahúsið | 28.000 | 30.000 | 30.000 | 35.000 | 35.000 | 86.000 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 1.100 | 1.100 | 2.000 | 1.000 | 1.000 | 5.000 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 2.500 | 1.100 | 1.000 | 0 | 0 | 0 |
| **§11 tilsamans** | **47.400** | **44.600** | **41.000** | **45.100** | **48.000** | **102.000** |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §12 | | | | | | |
| Dugni skúlin | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Bústovnar | 10.600 | 33.500 | 32.100 | 0 | 22.500 | 11.000 |
| **§12 tilsamans** | **12.600** | **33.500** | **32.100** | **0** | **22.500** | **11.000** |
| | | | | | | |
| §15 | | | | | | |
| Umvæling av alm. bygningum | 24.000 | 22.000 | 21.000 | 22.000 | 22.000 | 22.000 |
| Oljudálking á sjónum | 500 | 600 | 1.000 | 0 | 0 | 0 |
| Dagføring av brúm og tunlum | 4.000 | 3.800 | 4.000 | 4.000 | 8.000 | 7.100 |
| Innkoyringarvegur til Tórshavn | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.000 |
| Trygdartiltøk | 5.000 | 4.200 | 4.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| Vegagerð í Lervík | 18.000 | 18.000 | 8.000 | 0 | 0 | 0 |
| Rituvíkarvegurin | 6.500 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kalsoy | 3.000 | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Søla av jørð til kommunur | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 | -100 |
| Viðareiðisloysn | 5.000 | 10.000 | 5.000 | 5.000 | 44.000 | 5.000 |
| Havnin í Skúvoy | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Bakkaverja Fámjin | 300 | 700 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Flogferðsla, tyrlupallur | 2.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hvalbiartunnilin | 0 | 0 | 0 | 0 | 9.000 | 20.000 |
| Sandoyartunnilin | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.000 |
| **§15 tilsamans** | **72.200** | **61.200** | **42.900** | **35.900** | **87.900** | **69.000** |
| | | | | | | |
| **Løguútreiðslur §1-§16** | **234.700** | **280.000** | **280.000** | **280.000** | **275.000** | **275.000** |
| *Indeks* | *100* | *119* | *119* | *119* | *117* | *117* |

### § 1 Løgtingið
Eingin løgutiltøk eru ásett fyri greinina.

### § 2 Løgmansfyrisitingin
2,7 mió. kr. verða avsettar til umbygging í Tinganesi.

### § 3 Fíggjarmál
Eingin løgutiltøk eru ásett fyri greinina.

### § 5 Fiskivinnumál
30 mió. kr. verða settar av til at smíða havrannsóknarskip í 2012, 55 mió. kr. í 2013 og 90 mió. kr. í 2014, tá skipið verður liðugt bygt.

### § 6 Vinnumál
Avsettar eru 5 mió. kr. í 2012 til at keypa eina ferju til Skúvoyarleiðina.

**§ 7 Mentamál**
Til bygging av Skúladepilinum við Marknagil verða settar av 80 mió. kr. í 2012 og tilsamans 302 mió. kr. eftirfylgjandi árini. Árini 2010-2011 vórðu játtaðar 61,5 mió. kr. Sambært verklagslógini er heimild at hava byggiútreiðslur fyri 391 mió. kr. Restin er til innbúgv.

Til gerð av ítróttarhøll í Sandoynni verður játtaðar 11 mió. kr. í 2012 at gera høllina lidna. Sambært verklagslógini um at byggja ítróttarhøll í Sandoynni er heimild at hava byggi-útreiðslur fyri 27 mió. kr.

Tekniski skúli í Klaksvík verður útbygdur fyri 6 mió. kr. í 2012.

Byrjað verður uppá Tjóðleikhús. Í 2012 verða játtaðar 2 mió. kr.

Til studentaskúlin í Hoydølum verða játtaðar 2 mió. kr. í 2012 til viðlíkahaldsumvæling

Til hvalastøðina við Áir verða játtaðar 1 mió. kr.

Til Kirkjubømúrin verða játtaðar 1 mió. kr.

**§ 11 Heilsumál**
Til Apoteksverkið verða játtaðar 5,2 mió. kr. í 2012 til liðugtgerð av dagføring av heilivágs-framleiðsluni.

Til medicoteknisk tól verða játtaðar 7,2 mió. kr. í 2012.

Til útbygging av landssjúkrahúsinum verða játtaðar 30 mió. kr. í 2012. Sambært verandi verklagslóg kunnu útreiðslurnar í mesta lagi verða 150 mió. kr.

Til umvælingar av Klaksvíkar sjúkrahúsi verða játtaðar 1,1 mió. kr. í 2012.

Til útbygging av Suðuroyar sjúkrahúsi verða játtaðar 1,1 mió. kr. í 2012.

**§ 12 Almannamál**
Til Bústovnar verða játtaðar 33,5 mió. kr. í 2012. Stórur tørvur er at byggja sambýli til fólk við sálarsjúku og menningartarni. Í ár verður farið undir at byggja sambýli til fólk við sálarsjúku, og hildið verður fram í 2012, soleiðis at sambýlið verður klárt at taka í nýtslu í byrjanini av 2013.

Somuleiðis verður í ár farið undir fyrireiking at byggja sambýli í Eysturoynni og Norðuroyggjum fyri fólk við menningartarni, og hildið verður fram við byggingini í 2012

og 2013, soleiðis at heimini kunnu lata upp í 2013. Eisini verður í ár farið undir at byggja nýggjan stovn til børn við fjølbreki, og er ætlanin at stovnurin verður klárur at taka í nýtslu miskeiðis í 2013.

**§ 15 Innlendismál**
Til umvæling av almennum bygningum verða játtaðar 22 mió. kr.

Til vegagerð í Leirvík verða játtaðar 18 mió. kr. í 2012. Sambært verklagslógini kann kostnaðurin av verkætlanini í mesta lagi verða 45 mió. kr.

Til Viðareiðisloysn verða játtaðar 10 mió. kr. í 2012.

Til dagføring av brúm og tunlum verða játtaðar 3,8 mió. kr.

Til trygdartiltøk verða játtaðar 4,2 mió. kr.

Til vegir og tunlar í Kalsoynni verða játtaðar 2 mió. kr.

Til bakkaverju í Fámjin verða játtaðar 700 tús. kr.

Til fyribyrging av oljudálking á sjónum verða játtaðar 600 tús. kr.

Standandi heimild er at selja jørð til kommunur fyri 100 tús. kr. árliga.

**§ 16 Uttanríkismál**
Eingin løgutiltøk eru ásett fyri greinina.

# Appendiks: Framskrivingar

Talvurnar vísa framskrivingar frá 2012-2016 býttar á einstakar greinar og høvuðskontur. Fyri hvørja grein á fíggjarlógini er fyrst ein talva sum telur saman, og síðani er ein talva við einstøku høvuðskontunum, sum verða framskrivaðar.

## § 1 Løgtingið

**Talva A.1: Samlaðar framskrivingar fyri § 1 Løgtingið**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **39.325** | **39.325** | **39.325** | **39.325** | **39.325** | **39.325** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarbundin játtan** | **4.553** | **6.553** | **4.553** | **4.553** | **4.553** | **6.553** |
| *Indeks* | *100* | *144* | *100* | *100* | *100* | *144* |
| **Stuðulsjáttan** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Tilsamans** | **43.878** | **45.878** | **43.878** | **43.878** | **43.878** | **45.878** |
| *Indeks* | *100* | *105* | *100* | *100* | *100* | *105* |

**Talva A.2: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 1 Løgtingið**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 4.553 | 6.553 | 4.553 | 4.553 | 4.553 | 6.553 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **4.553** | **6.553** | **4.553** | **4.553** | **4.553** | **6.553** |
| *Indeks* | *100* | *144* | *100* | *100* | *100* | *144* |

**Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn**: Bíðiløn ísv. løgtingsval verður mett at kosta 2 mió. kr. í 2012.

## § 2 Løgmansfyrisitingin

**Talva A.3: Samlaðar framskrivingar fyri § 2 Løgmansfyrisitingin**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **14.175** | **14.175** | **14.175** | **14.175** | **14.175** | **14.175** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarbundin játtan** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Stuðulsjáttan** | **2.700** | **2.700** | **2.700** | **2.700** | **2.700** | **2.700** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **16.875** | **16.875** | **16.875** | **16.875** | **16.875** | **16.875** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |

Ongin framskriving er fyri árini 2012-2016.

## § 3 Fíggjarmál

**Talva A.4: Samlaðar framskrivingar fyri § 3 Fíggjarmál**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **124.622** | **120.922** | **117.122** | **117.122** | **117.122** | **117.122** |
| *Indeks* | *100* | *97* | *94* | *94* | *94* | *94* |
| **Lógarbundin játtan** | **303.736** | **310.386** | **318.186** | **326.536** | **339.086** | **352.586** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *105* | *108* | *112* | *116* |
| **Stuðulsjáttan** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** | **200** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **428.558** | **431.508** | **435.508** | **443.858** | **456.408** | **469.908** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *104* | *106* | *110* |

**Talva A.5: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 3 Fíggjarmál**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Hagstovan | 16.540 | 12.840 | 9.040 | 9.040 | 9.040 | 9.040 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **16.540** | **12.840** | **9.040** | **9.040** | **9.040** | **9.040** |
| *Indeks* | *100* | *78* | *55* | *55* | *55* | *55* |
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Tænastumannaeftirlønir | 21.500 | 22.000 | 22.300 | 22.800 | 23.100 | 23.600 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eftirløn landsstýrismanna | 1.700 | 2.200 | 2.300 | 2.350 | 2.400 | 2.800 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið | 12.750 | 13.200 | 13.800 | 14.400 | 15.000 | 15.600 |
| Stuðul til flutning og dupult húsarhald | 17.000 | 17.500 | 17.500 | 17.500 | 17.500 | 17.500 |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 87.000 | 87.000 | 83.000 | 79.000 | 79.000 | 79.000 |
| Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | 16.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Læraraeftirlønir | 33.500 | 38.100 | 42.900 | 48.100 | 53.700 | 59.700 |
| FAS-endurgjald | 105.000 | 120.000 | 125.000 | 130.000 | 135.000 | 140.000 |
| Postverk Føroya, eftirlønir | 7.136 | 8.236 | 9.236 | 10.236 | 11.236 | 12.236 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **301.586** | **308.236** | **316.036** | **324.386** | **336.936** | **350.436** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *105* | *108* | *112* | *116* |

**Hagstovan**: Manntalið verður framt á heysti 2011, men framvegis er játtan til greining í 2012. Játtanin minkar tí 3,7 mió. kr. í 2012 og aðrar 3,8 mió. kr. í 2012.

**Tænastumannaeftirlønir**: Ávísur líðandi vøkstur er í tænastumannaeftirlønunum.

**Eftirløn landsstýrismanna**: Talið av móttakarum er vaksið, og kann væntast at vaksa enn meira komandi árini.

**Eftirlønir innan heilsuverkið**: Ávísur líðandi vøkstur er í eftirlønunum inna heilsuverkið.

**Stuðul til flutning og dupult húsarhald**: Játtanin verður hækkað vegna økt virksemi.

**Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði**: Stuðulsskipanin verður sambært lóg avtikin við árslok 2011.

**Stuðul til rentuútreiðslur**: Rentustuðulin lækkar 1 prosentstig í 2012 til 37 %, men fellur sparingin eftir galdandi lóg til kommunurnar í 2012. Í 2013 og 2014 lækkar rentustuðulin somuleiðis 1 prosentstig um árið til 35% og fellur sparingin tá til landið, við árligari sparing á 4 mió. kr.

**Læraraeftirlønir**: Stórur vøkstur verður mettur at vera í læraraeftirlønunum komandi árini.

**FAS-endurgjald**: Framhaldandi fleiri skip koma í FAS. Samsvarandi upphædd er inntøka á § 20.

**Postverk Føroya, eftirlønir**: Stórur vøkstur verður mettur at vera í eftirlønunum til starvsfólk innan postverkið komandi árini.

## § 5 Fiskivinnumál

**Talva A.6: Samlaðar framskrivingar fyri § 5 Fiskivinnumál**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **129.985** | **141.985** | **143.585** | **141.985** | **141.985** | **141.985** |
| *Indeks* | *100* | *109* | *110* | *109* | *109* | *109* |
| **Lógarbundin játtan** | **8.200** | **7.500** | **7.500** | **7.500** | **7.500** | **7.500** |
| *Indeks* | *100* | *91* | *91* | *91* | *91* | *91* |
| **Stuðulsjáttan** | **13.910** | **13.910** | **13.910** | **13.910** | **13.910** | **13.910** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **152.095** | **163.395** | **164.995** | **163.395** | **163.395** | **163.395** |
| *Indeks* | *100* | *107* | *108* | *107* | *107* | *107* |

**Talva A.7: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 5 Fiskivinnumál**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Hvalagransking og hvalateljing v.m. | 981 | 981 | 2.581 | 981 | 981 | 981 |
| Fiskiveiðieftirlit | 14.000 | 26.000 | 26.000 | 26.000 | 26.000 | 26.000 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **14.981** | **26.981** | **28.581** | **26.981** | **26.981** | **26.981** |
| *Indeks* | *100* | *180* | *191* | *180* | *180* | *180* |
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Flutningsstuðul | 3.200 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **3.200** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** | **2.500** |
| *Indeks* | *100* | *78* | *78* | *78* | *78* | *78* |

**Hvalagransking og hvalateljing v.m.**: Hvalakanning er 6. hvørt ár, og veksur játtanin tí í 2013.

**Fiskiveiðieftirlit**: Nýggjur tyrlusáttmáli v.m. ger, at útreiðslurnar vaksa 12 mió. kr. árliga frá 2012.

**Flutningsstuðul**: Nýggj meting er gjørd, sum vísir, at støðið verður tað sama sum í roknskapinum 2010.

## § 6 Vinnumál

**Talva A.8: Samlaðar framskrivingar fyri § 6 Vinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **171.384** | **185.634** | **199.634** | **183.634** | **212.634** | **210.634** |
| *Indeks* | *100* | *108* | *116* | *107* | *124* | *123* |
| **Lógarbundin játtan** | **90.300** | **93.000** | **94.850** | **96.750** | **98.700** | **100.700** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *107* | *109* | *112* |
| **Stuðulsjáttan** | **15.780** | **15.780** | **15.780** | **15.780** | **15.780** | **15.780** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **277.464** | **294.414** | **310.264** | **296.164** | **327.114** | **327.114** |
| *Indeks* | *100* | *106* | *112* | *107* | *118* | *118* |

**Talva A.9: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 6 Vinnumál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Jarðfeingi | 12.492 | 11.742 | 11.742 | 11.742 | 11.742 | 11.742 |
| Strandfaraskip landsins | 125.146 | 93.746 | 107.746 | 91.746 | 110.746 | 108.746 |
| Oljujáttan SSL | 0 | 42.900 | 42.900 | 42.900 | 52.900 | 52.900 |
| Tyrlutænastan | 6.600 | 10.100 | 10.100 | 10.100 | 10.100 | 10.100 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **144.238** | **158.488** | **172.488** | **156.488** | **185.488** | **183.488** |
| *Indeks* | *100* | *110* | *120* | *108* | *129* | *127* |
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Barsilsskipanin | 90.300 | 93.000 | 94.850 | 96.750 | 98.700 | 100.700 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **90.300** | **93.000** | **94.850** | **96.750** | **98.700** | **100.700** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *105* | *107* | *109* | *112* |

**Jarðfeingi:** Av tí, at landgrunsverkætlanin endar í 2011, minkar játtanin til Jarðfeingi við 750 tús. kr. í 2012.

**Tyrlutænastan**: Nýggjur tyrlusáttmáli v.m. ger, at útreiðslurnar vaksa 3,5 mió. kr. árliga frá 2012.

**Strandfaraskip landsins**: Frá 2012 at rokna verður oljan hjá strandferðsluni løgd á egna høvuðskontu fyri at játtanarligu umstøðurnar hjá Strandferðsluni kunnu vera javnari. 34,4 mió. kr. verða tí tiknar av verandi høvuðskontu hjá Strandferðsluni og lagdar á egna høvuðskontu. Harumframt verða 8,5 mió. kr. lagdar inn á nýggju høvuðskontuna vegna vaksandi oljuútreiðslur. Óvissa er um oljuprísin, og er tí somuleiðis óvissa um játtanar-tørvin á nýggju oljukontuni.

Á játtanini til Strandferðsluna verða lagdar 3 mió. kr. afturat fyri dokking av Teistanum í 2012. Samlaða játtanarbroytingin í 2012 fyri Strandferðsluna er tí -34,4 + 3 = -31,4 mió. kr.

Í 2013 minkar játtanin, tí at dokkingin av Teistanum er liðug.Smyril skal tó á dokk hetta árið, og verður tað mett at kosta 17 mió. kr. Samlaða játtanarbroytingin í 2013 í mun til 2012 fyri Strandferðsluna er tí -3 +17 = 14 mió. kr.
Í 2014 verður eftirlit við motorunum hjá Sam og Teistanum. Hetta verður mett at kosta tilsamans 1 mió. kr. Samlaða játtanarbroytingin í 2014 í mun til 2013 fyri Strandferðsluna er tí -17 +1 = -16 mió. kr.

Í 2015 skal Smyril á dokk (10-ára klassing), og verður tað mett at kosta 19 mió. kr. Eftirlit verður harumframt við motorunum hjá Sam og Teistanum fyri tilsamans 1 mió. kr. Samlaða játtanarbroytingin í 2015 í mun til 2014 fyri Strandferðsluna er tí -1 +19 +1 = 19 mió. kr.

Á oljukontuni skal serliga viðmerkjast, at krøv verða um, at tungolja ikki kann nýtast innanoyggja frá 2015. Hetta hækkar oljuútreiðslurnar fyri Strandferðsluna við 10 mió. kr. um árið.

## § 7 Mentamál

**Talva A.10: Samlaðar framskrivingar fyri § 7 Mentamál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **720.758** | **731.258** | **737.758** | **743.258** | **748.758** | **754.258** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *102* | *103* | *104* | *105* |
| **Lógarbundin játtan** | **119.682** | **125.882** | **129.232** | **131.732** | **133.932** | **135.682** |
| *Indeks* | *100* | *105* | *108* | *110* | *112* | *113* |
| **Stuðulsjáttan** | **74.214** | **75.414** | **76.714** | **76.714** | **76.714** | **76.714** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *103* | *103* | *103* |
| **Tilsamans** | **914.654** | **932.554** | **943.704** | **951.704** | **959.404** | **966.654** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *104* | *105* | *106* |

**Talva A.11: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 7 Mentamál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Fólkaskúlin | 280.101 | 282.601 | 285.101 | 287.601 | 290.101 | 292.601 |
| Miðnámsútbúgvingar | 184.640 | 190.640 | 193.640 | 195.640 | 197.640 | 199.640 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 70.477 | 72.477 | 73.477 | 74.477 | 75.477 | 76.477 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **535.218** | **545.718** | **552.218** | **557.718** | **563.218** | **568.718** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *104* | *105* | *106* |
| | | | | | | |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| ES-granskingarskrá | 8.500 | 9.700 | 11.000 | 11.000 | 11.000 | 11.000 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **8.500** | **9.700** | **11.000** | **11.000** | **11.000** | **11.000** |
| *Indeks* | *100* | *114* | *129* | *129* | *129* | *129* |
| | | | | | | |
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Lestrarstuðul | 119.682 | 125.882 | 129.232 | 131.732 | 133.932 | 135.682 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **119.682** | **125.882** | **129.232** | **131.732** | **133.932** | **135.682** |
| *Indeks* | *100* | *105* | *108* | *110* | *112* | *113* |

**Fólkaskúlin**: Av tí, at sáttmálasettir lærarar vaksa í tali í mun til tænastumannasettar, veksur eftirlønarkostnaðurin á høvuðskontuni. Starvsaldursbroytingar hava somuleiðis ávirkan á játtanina.

**Miðnámsútbúgvingar**: Vøksturin stavar frá framrulling av øktum talið av flokkum seinastu árini.

**Fróðskaparsetur Føroya**: Vøksturin stavar frá framskriving av øktum virksemi.

**ES-granskingarskrá**: Hækking er samsvarandi heimildarlógini.

**Lestrarstuðul**: Vøksturin í útreiðslunum stavar frá hægri tali av lesandi.

## § 11 Heilsumál

**Talva A.12: Samlaðar framskrivingar fyri § 11 Heilsumál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **875.766** | **894.687** | **902.678** | **911.088** | **919.943** | **929.270** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *104* | *105* | *106* |
| **Lógarbundin játtan** | **7.700** | **8.700** | **7.700** | **7.700** | **7.700** | **7.700** |
| *Indeks* | *100* | *113* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **325** | **325** | **325** | **325** | **325** | **325** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **883.791** | **903.712** | **910.703** | **919.113** | **927.968** | **937.295** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *103* | *104* | *105* | *106* |

**Talva A.13:Útgreinaðar framskrivingar fyri § 11 Heilsumál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Landssjúkrahúsið | 383.756 | 388.484 | 388.484 | 388.484 | 388.484 | 388.484 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 62.323 | 62.598 | 62.598 | 62.598 | 62.598 | 62.598 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 50.541 | 50.780 | 50.780 | 50.780 | 50.780 | 50.780 |
| Serstakur sjúkrahúsheilivágur | 34.900 | 38.739 | 41.838 | 45.185 | 48.800 | 52.704 |
| Serviðgerð uttanlands | 129.922 | 139.762 | 144.654 | 149.717 | 154.957 | 160.380 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **661.442** | **680.363** | **688.354** | **696.764** | **705.619** | **714.946** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *104* | *105* | *107* | *108* |
| **Lógarbundin játtan** | | | | | | |
| Koppsetingar | 5.400 | 6.400 | 5.400 | 5.400 | 5.400 | 5.400 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **5.400** | **6.400** | **5.400** | **5.400** | **5.400** | **5.400** |
| *Indeks* | *100* | *119* | *100* | *100* | *100* | *100* |

**Landssjúkrahúsið**: 2% hækking vegna dýrking av olju, el og viðgerðarvørum tilsamans 1,9 mió. kr. og onnur framskriving á 2 mió. kr. Harumframt er framskriving av neurologi fyri fult ár 800 tús. kr.

**Klaksvíkar sjúkrahús**: 2% hækking vegna dýrking av olju, el og viðgerðarvørum er 275 tús. kr. í 2012.

**Suðuroyar sjúkrahús**: 2% hækking vegna dýrking av olju, el og viðgerðarvørum er 239 tús. kr. í 2012.

**Serstakur sjúkrahúsheilivágur**: Vøksturin stavar frá dýrking av heilivági.

**Serviðgerð uttanlands**: Útreiðslurnar verða mettar at vaksa komandi árini.

**Koppsetingar** : Aldurin fyri HVP koppseting verður lækkaður niður í 12 ár og førir hetta til meirkostnað á játtanini á 1 mió. kr. í 2012.

# § 12 Almannamál

**Talva A.14: Samlaðar framskrivingar fyri § 12 Almannamál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **631.506** | **656.194** | **711.740** | **727.270** | **724.592** | **727.295** |
| *Indeks* | *100* | *104* | *113* | *115* | *115* | *115* |
| **Lógarbundin játtan** | **964.651** | **992.126** | **1.003.556** | **1.016.299** | **1.029.912** | **1.044.899** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *104* | *105* | *107* | *108* |
| **Stuðulsjáttan** | **66.037** | **28.930** | **12.230** | **12.230** | **12.230** | **12.230** |
| *Indeks* | *100* | *44* | *19* | *19* | *19* | *19* |
| **Tilsamans** | **1.662.194** | **1.677.250** | **1.727.526** | **1.755.799** | **1.766.734** | **1.784.424** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *104* | *106* | *106* | *107* |

**Talva A.15: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 12 Almannamál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| KT-heildarskipan til Almannastovuna | 4.304 | 4.500 | 5.000 | 5.000 | 0 | 0 |
| Børn og ung | 44.916 | 44.916 | 45.616 | 46.316 | 46.316 | 46.316 |
| Serforsorg | 172.903 | 178.667 | 197.939 | 207.283 | 207.283 | 207.283 |
| Eldrarøkt | 330.526 | 349.254 | 384.328 | 389.814 | 392.136 | 394.839 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **552.649** | **577.337** | **632.883** | **648.413** | **645.735** | **648.438** |
| *Indeks* | *100* | *104* | *115* | *117* | *117* | *117* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Lán til ellis- og røktarheim í Vági | 18.000 | -2.707 | -2.707 | -2.707 | -2.707 | -2.707 |
| Studningslán til eldrabústaðir | 33.100 | 16.700 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **51.100** | **13.993** | **-2.707** | **-2.707** | **-2.707** | **-2.707** |
| *Indeks* | *100* | *27* | *-5* | *-5* | *-5* | *-5* |
| **Lógarbundin játtan:** | | | | | | |
| Barnavernd | 6.268 | 8.268 | 8.268 | 8.268 | 8.268 | 8.268 |
| Barnapeningur veittur í forskoti | 1.978 | 2.280 | 2.430 | 2.505 | 2.505 | 2.505 |
| Stuðul til uppihaldspening | 5.666 | 5.666 | 5.166 | 4.916 | 4.916 | 4.916 |
| Barnaískoyti | 7.450 | 7.950 | 8.450 | 8.750 | 8.750 | 8.750 |
| Ættleiðingarstuðul | 900 | 975 | 975 | 975 | 975 | 975 |
| Dagpeningaskipanin | 59.180 | 62.122 | 63.969 | 65.364 | 66.287 | 67.210 |
| Ansingarsamsýning | 14.390 | 14.390 | 13.890 | 13.390 | 12.890 | 12.390 |
| Vanlig forsorg | 153.340 | 158.896 | 160.296 | 161.296 | 162.196 | 162.796 |
| Fólkapensjón | 419.196 | 427.696 | 435.524 | 445.541 | 457.125 | 470.382 |
| Fyritíðarpensjón | 268.049 | 275.149 | 275.554 | 275.960 | 276.366 | 276.773 |
| Viðbót til ávísar pensjonistar | 26.075 | 26.575 | 26.875 | 27.175 | 27.475 | 27.775 |
| **Lógarbundin játtan tilsamans** | **962.492** | **989.967** | **1.001.397** | **1.014.140** | **1.027.753** | **1.042.740** |
| *Indeks* | *100* | *103* | *104* | *105* | *107* | *108* |

**KT-heildarskipan til Almannastovuna**: Verklagslóg er galdandi fyri økið. Sambært viðmerkingum til lógina, falla 4,5 mió. kr. til gjaldingar í 2012, 5 mió. kr. í 2013 og 5 mió. kr. í 2014.

**Børn og ung**: Uppskot til verklagslóg um bygging av stovni til børn við fjølbreki í Eysturoynni er lagt fyri Løgtingið. Sambært viðmerkingum til lógina er ilt at meta um rakstrarkostnaðin, tá nýggi stovnurin letur upp, men talan er um ein sera tungan bólk av børnum við fjølbreki, og tí kann roknast við eini árligari rakstrarútreiðslu á millum 2,6 til 4 mió. kr. Verandi játtan til Reiðrið er 2,6 mió. kr. í 2011. Avsettar eru 0,7 mió. kr. í hægri játtan frá 1. juli 2013, og sum er framskrivað til fult virksemi í 2014.

**Serforsorg**: Lagt er upp fyri fullum virksemi á Økisdeplinum í Vági í 2012 við játtan á 5.764 tús. kr.

Sambýlið í Tórshavn til fólk við sálarsjúku letur upp 1. januar 2013. Búfólkatalið er mett til 16, og við einum dagsprísi á 1700 kr. verða settar av 9.928 tús. kr.

Sambýli í Eysturoynni og í Norðoyggjum til fólk við menningartarni lata upp 1. januar 2013. Búfólkatalið er 32, og við einum dagsprísi á 1.600 kr. verða settar av 18.688 tús. kr.

**Eldrarøkt**: Lagt er upp fyri fullum virksemi á Ellis- og røktarheiminum í Vági í 2012 við játtan á 3.472 tús. kr. Samstundis, sum at tað verður fult virksemi, verður ein sparing í heimatænastuni, sum er mett til 306 tús. kr.

Lagt er upp fyri, at Ellis- og røktarheimið í Tórshavn letur upp í oktober 2012 við játtan á 7.867 tús. kr. og samstundis verður ein sparing í heimatænastuni á 624 tús. kr. Lagt er upp fyri fullum virksemi í 2013 við játtan á 31.466 tús. kr. og eini sparing í heimatænastuni á 2.496 tús. kr.

Lagt er upp fyri, at Ellis og røktarheimið í Vestmanna letur upp í juni 2012 við játtan á 6.883 tús. kr. og samstundis verður ein sparing í heimatænastuni á 546 tús. kr. Fult virksemi verður í 2013 við játtan á 11.800 tús. kr. og sparing í heimatænastuni á 936 tús. kr.

Lagt er upp fyri, at Ellis og røktarheimið í Klaksvík letur upp í mai 2013 við játtan á 7.867 tús. kr. og eini sparing í heimatænastuni á 624 tús. kr. Í 2014 verður fult virksemi, 11.800 tús. kr. og ein sparing í heimatænastuni á 936 tús. kr.

Á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya finst ein meting um øking í fólkatalinum í aldursbólkinum 67 ár og eldri. Nærverkið hevur gjørt eina útrokning, sum vísir, at miðalkostnaðurin fyri heimatænastu til borgarar 67 ár og eldri er umleið 15 tús. kr. árliga pr. fólk. Um verandi tænastustøði ikki skal versna, verður neyðugt at leggja fíggjarliga

upp fyri hesum vøkstri. Játtanin verður tí í 2012 framskrivað við 2,9 mió. kr., í 2013 við 2,4 mió. kr., í 2014 við 2,6 mió. kr., í 2015 við 3,2 mió. kr. og í 2016 við 3,5 mió. kr.

**Lán til ellis- og røktarheim í Vági**: Sambært lógini verður lánið afturgoldið yvir eitt 13 ára skeið við 1/156 parti hvønn mánað. Fyrsti avdrátturin verður goldin fyrsta mánaðin eftir, at grannskoðaði byggiroknskapurin fyriliggur, tó í seinasta lagi 7 mánaðir eftir, at byggiarbeiðið sambært byggiætlanini er liðugt. Samlaði lánsparturin er í mesta lagi 35,19 mió. kr. Lagt verður upp fyri, at byrjað verður at gjalda lánið aftur 1. januar 2012.

**Studningslán til eldrabústaðir**: Játtanarslagið varð broytt frá løgujáttan til stuðulsjáttan á fíggjarlógini 2010. Í tíðarskeiðnum 2009 til 2011 verða í mesta lagi latnar 95 mió. kr. í studningsláni úr landskassanum samanlagt, og í mesta lagi 45 mió. kr. í einum ári. Innan fyri hesar karmar varð landsstýriskvinnuni heimilað í 2009 at geva tilsagnir um játtan.

Tilsagnir eru givnar til íalt 95,2 mió. kr.

| | |
|---|---|
| Ellis- og røktarheimið í Tórshavn,(64*700) | 44,8 mió. kr. |
| Ellis- og røktarheimið í Klaksvík, (24*700) | 16,8 mió. kr. |
| Ellis- og røktarheimið í Vestmanna, (24*700) | 16,8 mió. kr. |
| Ellis- og røktarheimið í Vági, (24*700) | 16,8 mió. kr. |

Í 2008 vórðu 3.400 tús. kr. brúktar til Ellis- og røktarheimið í Vági. Í 2010 vórðu 42.000 tús. kr. brúktar. Í 2011 eru 33.100 tús. kr settar av á fíggjarlógini til endamálið. Munurin verður settur av í 2012, svarandi til 16,7 mió. kr.

**Barnavernd**: Økt virksemi.

**Barnapeningur veittur í forskoti**: Økt virksemi á 302 tús. kr. Eingin javning.

**Stuðul til uppihaldspening**: Eingin javning.

**Barnaískoyti**: Økt virksemi á 500 tús. kr. Eingin javning.

**Ættleiðingarstuðul**: Økt virksemi.

**Dagpeningaskipanin**: Økt virksemi við lønarframskrivingum á privata arbeiðsmarknaðinum.

**Ansingarsamsýning**: Eingin javning.

**Vanlig forsorg**: Økt virksemi á 5.556 tús. kr. Eingin javning.

**Fólkapensjón**: Økt virksemi á 16 mió. kr. Eingin javning

**Fyritíðarpensjón**: Økt virksemi á 7,1 mió. kr. Eingin javning.

**Viðbót til ávísar pensjonistar**: Økt virksemi á 500 tús. kr.

## § 15 Innlendismál

**Talva A.16: Samlaðar framskrivingar fyri § 15 Innlendismál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **99.725** | **101.025** | **99.925** | **99.925** | **100.125** | **101.025** |
| *Indeks* | *100* | *101* | *100* | *100* | *100* | *101* |
| **Lógarbundin játtan** | **280** | **280** | **280** | **280** | **280** | **280** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Stuðulsjáttan** | **8.295** | **8.695** | **8.595** | **8.495** | **8.395** | **8.295** |
| *Indeks* | *100* | *105* | *104* | *102* | *101* | *100* |
| **Tilsamans** | **108.300** | **110.000** | **108.800** | **108.700** | **108.800** | **109.600** |
| *Indeks* | *100* | *102* | *100* | *100* | *100* | *101* |

**Talva A.17: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 15 Innlendismál**

| *Tús. kr.* | **FL2011** | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan:** | | | | | | |
| Ymsar útreiðslur | 1.000 | 2.300 | 1.200 | 1.200 | 1.400 | 2.300 |
| **Rakstrarjáttan tilsamans** | **1.000** | **2.300** | **1.200** | **1.200** | **1.400** | **2.300** |
| *Indeks* | *100* | *230* | *120* | *120* | *140* | *230* |
| **Stuðulsjáttan:** | | | | | | |
| Spilloljureinsing | 3.500 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| Lánsafturgjald | -3.500 | -3.600 | -3.700 | -3.800 | -3.900 | -4.000 |
| **Stuðulsjáttan tilsamans** | **0** | **400** | **300** | **200** | **100** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |

**Ymsar útreiðslur**: Hækking í 2012 vegna løgtingsval.

**Spilloljureinsing**: Hækkaður stuðul til bygging av nýggjum spilloljuverki.

**Lánsafturgjald**: Lánsafturgjald frá IRF.

## § 16 Uttanríkismál

**Talva A.18: Samlaðar framskrivingar fyri § 16 Uttanríkismál**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarjáttan** | **33.075** | **33.075** | **33.075** | **33.075** | **33.075** | **33.075** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Lógarbundin játtan** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |
| *Indeks* | - | - | - | - | - | - |
| **Stuðulsjáttan** | **8.175** | **8.175** | **8.175** | **8.175** | **8.175** | **8.175** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |
| **Tilsamans** | **41.250** | **41.250** | **41.250** | **41.250** | **41.250** | **41.250** |
| *Indeks* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* | *100* |

Ongin framskriving er á grein 16.

## § 20 Inntøkur

**Talva A.19: Samlaðar framskrivingar fyri § 20 Inntøkur**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentur | 39.034 | 87.537 | 118.777 | 142.227 | 146.104 | 143.167 |
| Skattir | -1.988.670 | -2.154.210 | -2.194.210 | -2.234.210 | -2.275.210 | -2.317.210 |
| Avgjøld og tollur | -1.766.900 | -1.671.100 | -1.701.100 | -1.727.100 | -1.753.100 | -1.780.100 |
| Ymsar inntøkur | -36.000 | -46.460 | -46.460 | -46.460 | -46.460 | -46.460 |
| Heildarveiting o.t. | 150.000 | -615.500 | -615.500 | -615.500 | -615.500 | -615.500 |
| **Tilsamans** | **-4.218.036** | **-4.399.733** | **-4.438.493** | **-4.481.043** | **-4.544.166** | **-4.616.103** |
| *Indeks* | *100* | *104* | *105* | *106* | *108* | *109* |

**Talva A.20: Útgreinaðar framskrivingar fyri § 20 Inntøkur**

| *Tús. kr.* | FL2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ógreinað:** | | | | | | |
| Rentur at gjalda | 92.384 | 143.887 | 175.127 | 198.577 | 202.454 | 199.517 |
| Rentuinntøkur av innistandandi | -19.000 | -19.000 | -19.000 | -19.000 | -19.000 | -19.000 |
| Útgoldið yvirskot frá Danmarks Nationalbank | -11.000 | -14.000 | -14.000 | -14.000 | -14.000 | -14.000 |
| Vanligur landsskattur | -1.505.000 | -1.630.000 | -1.668.000 | -1.706.000 | -1.745.000 | -1.785.000 |
| Felagsskattur | -170.000 | -200.000 | -200.000 | -200.000 | -200.000 | -200.000 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kolvetnisskattur, feløg | -4.000 | -4.000 | -4.000 | -4.000 | -4.000 | -4.000 |
| Tilfeingisskattur | -25.000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kapitalvinningsskattur | -50.000 | -80.000 | -80.000 | -80.000 | -80.000 | -80.000 |
| Barsilsgjald | -92.300 | -95.000 | -95.000 | -95.000 | -95.000 | -95.000 |
| Meirvirðisgjald | -1.250.000 | -1.270.000 | -1.295.000 | -1.321.000 | -1.347.000 | -1.374.000 |
| Tollavgjøld | -30.000 | -32.000 | -32.000 | -32.000 | -32.000 | -32.000 |
| Brennioljuavgjald | -62.000 | -63.000 | -63.000 | -63.000 | -63.000 | -63.000 |
| Skrásetingargjald | -60.000 | -75.000 | -80.000 | -80.000 | -80.000 | -80.000 |
| Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | -3.000 | -3.500 | -3.500 | -3.500 | -3.500 | -3.500 |
| Útluting frá Fíggingargrunninum | -5.000 | -20.000 | -20.000 | -20.000 | -20.000 | -20.000 |
| Útluting frá almennum partafeløgum | -8.000 | -12.000 | -12.000 | -12.000 | -12.000 | -12.000 |
| Endurrindan av keyps-MVG | 150.000 | 140.000 | 140.000 | 140.000 | 140.000 | 140.000 |

**Rentur at gjalda**: Fortreytirnar fyri rentuframskrivingunum er metta gongdin í vaksandi landskassaskuldini og hækkandi rentustøði. Tað er Landsbanki Føroya, sum metir um gongdina í rentuútreiðslum landskassans.

**Vanligur landsskattur:** Játtanin í 2012 er hækkað við sløkum 8% í mun til roknskapin í 2010, broytt við hækking á 15 mió. kr. fyri FAS og lækking á 11 mió. kr. tí 2% eykaskatturin fellur burtur. Árini 2013 til 2016 verður játtanin framskrivað við 2% árliga, við tí fortreyt, at verandi landsskattastigi verður hildin óbroyttur fram til 2015.

**Meirviðisgjald**: Játtanin í 2012 er hækkað við góðum 7% í mun til roknskapin í 2010. Árini 2013 til 2016 verður játtanin framskrivað við 2% árliga, við tí fortreyt, at privata nýtslan fer at hækka nakað komandi árini.